# Miðnámsrit

5 mars 2015

## Um blaðið

Góðu lesarar!

Nú er eitt ár síðan, at fyrsta Miðnámsrit kom út. Fyri jól góvu vit bók út við greinum, ið hava staðið í netblaðnum 2014. Vit ætla at halda fram við at geva greinirnar út í bók; væntandi kemur ein nýggj út næsta vetur.

Í hesum blaðnum kunnu tit lesa grein hjá Vár í Ólavsstovu um vent flokshøli og venda læring. Rógvi Olavson hevur skrivað greinina *Skúli ella skrímsl* sum íkast til kjak um skúlasamanlegging og um depilin við Marknagil.

Tvær søguligar lýsingar eru um miðnámsskúlar. Kári N. Olsen hevur skrivað um Studentaskúlan í Eysturoy, sum byrjaði í 1982, og Jóannes A. Hansen um HF-skeiðið í Klaksvík, sum hevur meiri enn 40 ár á baki.

Olav hevur tvær greinir. Tann fyrra er um námsfrøðiliga leiðslu, tann seinna er um orðið eingilskt. Fyri jól kom bókin *Ævintýr* eftir Eyðun Andreassen út. Tórður hevur ummælt bókina.

*Blaðstjórn: Olav Absalonsen og Tórður Johannesarson*

# Innihaldsyvirlit

**Vent flokshøli og vend læring, Vár í Ólavsstovu** 3

**Námsfrøðilig leiðsla, Olav Absalonsen** 10

**Skúli ella skrímsl, Rógvi Olavson** 18

**HF-skeið í Klaksvík í meiri enn 40 ár, Jóannes A. Hansen** 21

**Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy, Kári N. Olsen** 28

**Ævintýr – eitt valaverk, Tórður Johannesarson** 34

**Eingilskt er føroyskt, Olav Absalonsen** 38

# Vent flokshøli og vend læring

Vár í Ólavsstovu

Øll, sum hava undirvíst í nógv ár, hava spurt seg sjálv spurningarnar: hvussu fái eg allar næmingarnar við, og er okkurt, sum eg kundi gjørt øðrvísi?

Tað er eingin ivi, at talgilda tøknin og talgild námsfrøði hava provokerað okkum í okkara fatan, hvussu eindarskúlin eigur at vera, tí tøknin letur dyrnar upp fyri øðrum møguleikum fyri undirvísing, miðlan av vitan, eftirmeting, fjølbroyttari næmingaluttøku, framleiðslu av uppgávusvarum, og ikki minst setur talgilda tøknin sosiala floksfelagsskapin í heilt annan samtekst.

VENT FLOKSHØLI og VEND LÆRING, á enskum flipped classroom og flipped learning, eru eitt slag av grasrótarrørslu, sum hevur sítt støði í praksis, eini úr neðra vísindi og tí ikki so ástøðilig og akademisk sum nógv onnur vísindi. Tað er kanska eitt eyðkenni við frálærufrøði, at hon í stóran mun byggir á royndir, lærarar hava gjørt sær, tí tað er ikki fyrr enn vit í frálærupraksis royna vísindaligt ástøði, at vit kunnu gera av, um praksis virkar. Vit vita, at tað er rættiliga trupult at staðfesta, hvør læring er farin fram. Vit kunnu gera ítøkiligar royndir og eftirmetingar, men heldur ikki tær kunnu við fullari vissu siga okkum, hvat næmingarnir hava lært. og hvørja undanvitan nýggja vitanin hevur knýtt seg til ella er vorðin grundarlag fyri til víðari vitanartilognan.

Spurningurin, nær vit læra, og hvussu vit læra, er knýttur at einstaklinginum, og nútíðarskúlin hevur ilt við at finna gylta millumvegin, har felagsundirvísingin skal fara fram. Við støði í egnum royndum veit eg, at bæði tann góði og tann veiki næmingurin hava trupulleikar við at menna seg víðari við støði í sínum egnu førleikum og fortreytum.

Vent flokshøli er sprottið í einum undirvísingarveruleika, sum mangir lærarar kenna aftur. Miðnámsskúlalærararnir Jonathan Bergmann og Aaron Sams, sum í mong ár hava undirvíst í evnafrøði,  byrjaðu frálærustevnuna VENT FLOKSHØLI nærum av tilvild. Teir sótu við spurninginum, hví næmingarnir alt ov ofta høvdu trupulleikar við at umlaga innihaldið í síni undirvísing til nýtiliga vitan, sum gjørdi teir førar fyri at gera heimaarbeiðið. Teir byrjaðu at taka undirvísingina upp á film og leggja tað út til næmingarnar, og tað gjørdi tað gjørligt, at næmingarnir kundu ogna sær ástøðiligu gjøgnumgongdina, sum vanliga fer fram í flokshølinum, í egnari ferð, og tá ið tað passaði inn í teirra arbeiðsdag.

Um VENDA LÆRING siga Bergmann og Sams, at hon er “neither a pedagogy nor an educational philosophy. Flipped learning is a flexible technique to be used when appropriate to maximize face-to-face time with students. And students are what matter most. Content

is important, and we encourage teachers to use flipped learning to drill down deep into the content that students must learn. We desire all students to have a solid foundation in a variety of subjects from which they can build future knowledge" (Bergmann & Sams 2014: 559).

Grundleggjandi byggir VENT FLOKSHØLI á, at tann fakliga innleiðslan, sum vanliga verður gjøgnumgingin í flokkinum, verður gjørd heima, og tað, sum vanliga varð gjørt sum heimaarbeiði, nú verður gjørt í flokkinum (Bergmann&Sams 2014: 192).

Sams og Bergmann vísa á, at talan er um ein øðrvísi námsfrøðiligan hugsanarhátt, har: "direct instruction moves from the group learning space, and the resulting group spaces is transformed into a dynamic, interactive learning environment where the educator guides students as they apply concepts and engage creatively in the subject matter". Teir vísa eisini á, at VEND LÆRING er einstaklingsvend læring, og at talan kann vera um ymisk hátta-løg, frábrigdi og sløg av næmingasavnaðari læring, har miðlanin av fakliga tilfarinum er: "differentiated instruction, problem/project-based learning, inquire-based study, and many others." Teir vísa á, at hesar strategiir eru lættar at seta í verk, og teir vísa á, at VEND LÆRING er grundleggjandi næmingadeplað (Bergmann & Sams 2014: 203).

At seta næmingin og læring hansara í miðdepilin var greitt tann hugsan, sum lá undir at taka samvirknar talvur í nýtslu í skúlastovunum. Námsfrøðiliga ætlanin var, at næmingur-in í fakligum uppgávuloysnum og fakligum samskifti skuldi yvirtaka talvuna. Tá ið eg havi tosað við lærarar, er tað rættiliga sjáldan, at næmingar sleppa fram at talvuni, og tað eru rættiliga nógvir lærarar, sum als ikki fáa gagnnýtt teir møguleikar, sum samvirkna talvan hevur. Samvirkna talvan tykist einans at hava avloyst ta grønu, svørtu ella hvítu talvuna. Samskiftið millum lærara og næming tykist óbroytt við samvirknu talvunum. Lærarar, eg havi tosað við, tykjast meiri at sakna gomlu talvuna enn at fegnast um teir frálæru-møguleikar, sum nýggja samvirkna talvan gevur teimum av ymsum frálæruháttum, og næmingurin tykist als ikki at vera sloppin fram at talvuni, sum jú var eitt av aðalmálunum við samvirknu talvunum. Vit kunnu bara gita okkum til, hví talvurnar ikki hava havt stórar frálærufrøðiligar broytingar við sær.

Ein lítil kanning millum fólkaskúlalærarar, sum ein lesandi á NÁD gjørdi á sumri 2014, gevur eina ábending um, at nógvir lærarar halda seg ikki hava førleikan at nýta samvirknu talvurnar til fulnar, og at tað tekur nógva tíð heima at gera talvurnar. Lærarar halda eisini, at tað tekur dekan og nógva tíð at tendra talvurnar, og tann afturvendandi trupulleikin tykist vera, at tøknin virkar illa og koyrir ov seint. Hesar orsøkirnar verða tiknar fram sum frágreiðing um, at samvirknu talvurnar og aðrir tøkniligir miðlar ikki verða meira brúkt í undirvísingini (Kerá 2014).

VEND FRÁLÆRA knýtir seg at óformligu læring næmingsins, hon nýtir førleikar, sum skúlin ikki hevur "lært" teir, men sum tøknin og viljin at brúka møguleikarnar, sum tøknin gevur teimum, hevur lært næmingarnar. Um undirvísing á henda hátt siga Bergmann og Sams, at næmingar í dag skilja, hvat talgild læring snýr seg um, og at teir sum lærarar einans tosa við næmingarnar á teirra egna máli. Um atfinningarnar, at næmingar frammanundan brúka ov nógva tíð við talgildum miðlum, siga teir heilt einfalt, at teir gagnnýta talgilda videomentan í læringarmiðlanini í staðin fyri at berjast ímóti henni (Bergmann & Sams 2012: 21).




Við tað at VENT FLOKSHØLI ella VEND LÆRING ikki eru eintýddir læringarstílar, er trupult at tosa um eina endaliga allýsing av, hvat VENT FLOKSHØLI ella VEND FRÁLÆRA eru. Heldur ikki kunnu vit tosa um, at vit burturav skulu undirvísa soleiðis, tí fakligt samskifti millum lærara/næmingar og næmingar/næmingar sínámillum verður altíð ein partur av fakligu menningini, men møguleikin fyri, at fleiri kunnu luttaka er væl størri, tí tey hava ognað sær vitanina við teirri tilgongd og teirri ferð, sum hóskar til teirra. VEND FRÁLÆRA gevur møguleikar, sum vit ikki hava havt fyrr og gevur okkum møguleikar at samantvinna formliga og óformliga læring, soleiðis at skilja, at næmingar í formligari læring kunnu brúka sínar tøkniligu talgildu førleikar, sum teir hava ognað sær ígjøgnum m.a. spæl. Henda óformliga vitanin gevur eina ørgrynnu av møguleikum, sum VEND FRÁLÆRA kann fáa nógvan ágóða av, samstundis sum vitanartilognanin gerst einstaklingslagað og gevur einstaka næminginum ta avbjóðing, sum hann megnar júst ta løtuna, tá ið evnið/tilfarið skal lærast. Tað er ein spurningur um at venda sær frá læraranum og hansara fakliga førleika og fakmiðlan og heldur hugsa um læringartilgongd næmingsins. Eingin læringartilgongd verður heilt eins. Sjálvt um tú sum lærari brúkar VENDA FRÁLÆRU sum læringarstrategi, hongur frálæran framvegis saman við, hvussu lærarin er, hansara fakligu kunnleikum og førleikum og ikki minst evnum hansara at miðla fakliga vitan.

Bergmann og Sams hava við støði í teimum royndum, teir hava við VENDUM FLOKSHØLI, flutt seg frá at tosa um VENT FLOKSHØLI, har øll síggja sama film og arbeiða við sama evni í næmingalagaðum samteksti. Teir tosa í dag um VENDA FØRLEIKALÆRING (Flipped-Mastery Model), har næmingar fara víðari til nýtt tilfar og nýggjar filmar ella hyggja umaftur, alt eftir, hvussu teir skilja og megna tað nýggja tilfarið og eru førir fyri at loysa uppgávur (Bergmann & Sams 2012: 34)

Næmingalagað undirvísing er avgjørt ein týðandi partur av VENDUM FLOKSHØLI og serliga VENDARI FØRLEIKALÆRING, og Bergmann og Sams vísa á, at við VENDUM FLOKSHØLI brúka teir meiri tíð til veiku næmingarnar enn fyrr, tí tá vóru tað teir góðu næmingarnir, sum tóku lut og spurdu í undirvísingini. Nú hava hesir næmingar sum oftast fingið svarið í filminum, og meiri tíð verður tískil til at hjálpa teimum næmingunum, sum ikki skilja fakligu spurningarnar (Bergmann & Sams 2012: 27f). Tað er eingin ivi, at tað er ymiskt, alt eftir hvørja lærugrein talan er um, hvussu VENT FLOKSHØLI og VEND LÆRING kunnu nýtast, men vert er at undirstrika, at teir filmar, sum næmingarnir skulu hyggja at heima, einans skulu avloysa ta fakligu innleiðsluna, sum lærarin vanliga hevur, tá ið næmingarnir hava fyrireikað seg heima til eitt evni.

Bergmann og Sams eru eftir nøkrum árum við VENDUM FLOKSHØLI og VENDARI FØRLEIKALÆRING komnir til ta sannkenning, at tað eru ymiskir hættir, sum næmingarnir læra uppá, og teir vísa á, at teir næmingar, sum ikki halda seg læra við at síggja filmarnar, kunnu brúka aðrar hættir at ogna sær vitan. Hesir næmingar kunnu t.d. lesa í lærubókum ella finna tilfar á alnetinum. Teir eru tískil við tíðini givnir at krevja, at næmingarnir hyggja at filminum, halda teir seg ikki læra av teimum. Tað, at næmingarnir sjálvir gera av, um teir hyggja at filmunum ella ogna sær vitan á annan hátt, hevur sambært teimum givið teimum ábyrgd av síni egnu læring (Bergmann & Sams 2012: 67). Tær "nógvu" síðurnar, sum serliga næmingar á miðnámsskúla verða noyddir at lesa fyri at seta seg inn í eitt evni, mugu teir framvegis lesa, men fakliga høvuðsúrdráttin í dagsins heimaarbeiði, sum vanliga verður gjøgnumgingin av læraranum í onkrum slagi av yvirhoyring, fáa tey í filminum, og tað er hann, sum í høvuðsheitum skal brúkast at stuðla uppgávuloysnum og bólkaarbeiði í skúlanum.

Við tað, at stórur partur av lærarans tíð snýr seg um at hjálpa næmingunum, kann hann laga undirvísingina til einstaka næmingin. Næmingar, sum skilja skjótt, hava ikki fyri neyðini at loysa so nógvar uppgávur. Slíkur arbeiðsháttur verður eitt slag av einstaklings-arbeiðssáttmálum, sum verður undirskrivaður av hvørjum næmingi sær, har teir verða noyddir at prógva sína fatan av fakliga tilfarinum. Bergmann og Sams hava royndir við, at næmingar virða hesa skipan, tí teir skilja, at lærarin ikki er áhugaður í bara at halda teimum í gongd, men at tað snýr seg um læring.

Fakligu filmir lærarans byggja sambært Bergmann og Sams á niðastu fláirnar í taksonomi Blooms. Teir eru best nýttir sum tilfarsavhendingarambоð í teimum niðastu fláunum: at minnast og skilja. Tað gevur lærarunum høvi at brúka sína virðismiklu flokstíð saman við næmingunum í tilgongdini at megna førleikar á hægri stigum í taksonomi Blooms, sum føra til djypri læring.

Royndir, gjørdar í USA, vísa, at filmarnir, sum eru lagdir út í sambandi við vent flokshøli, ofta verða sæddir av foreldrunum eisini, og hetta skapar gott fakligt kjak millum foreldur og næmingar og er við til at økja fakliga tilvit næmingsins í samvinnu við nærfelagsskapin (Bergmann & Sams 2012: 30) og kann soleiðis vera við til at skapa læringarfelagsskap uttan fyri skúlan, sum kann hjálpa næmingunum í læringartilgongdini.




Í vendari læring verður taksonomi Blooms í stóran mun sett í verk í øvutari røð, tí næmingarnir byrja við úrslitinum – skapanini og framleiðsluni - og arbeiða niðureftir, so staklutirnir í úrslitinum gerast greiðari, og ítøkiliga vitanin um einstøku stigini, sum føra til úrslitið, verða meiri tilvitað. Teir fara niður í taksonomiløgini, so hvørt teir hava brúk fyri at ítøkiliggera vitanina, sum førir til endaliga úrslitið. Við tað at hugsjónargrundar-lagið undir vendari læring og vendari førleikalæring er lagað til  fakliga hegnið hjá hvørjum næmingi sær, fara teir víðari hvør í sínum lagi, tá ið teir megna vitanarstigið, teir eru á. Hesin læringarstílur ger, at næmingarnir brúka mestu tíðina til at skapa og eftir-meta, og tá ið teir renna á eina fakliga forðing, fara teir niður á lægri stig í taksonomiini, finna ta vitan, teir hava brúk fyri, og fara síðani upp á toppin aftur, har teirra verkætlan er (Bergmann & Sams 2014: 528).




## Filmsgerð

Filmarnir skulu vera léttir og skjótir at framleiða, og royndir, sum eru gjørdar aðrastaðni, vísa, at tað besta er, at tað er egni lærari floksins, sum ger filmarnar. Hvør filmur skal helst ikki vera drúgvari enn 8 minuttir. Sjálvandi eru undantøk, um næmingurin fær onkra rímiliga létta yvirlitskenda innleiðslu. Tó skulu teir filmarnir heldur ikki fara upp um 15 min. Tí skulu vit heldur gera fleiri filmar um sama evni fyri at tryggja okkum, at filmarnir ikki gerast ov langir. Avbjóðingin í filmsgerðini er at halda áhuganum hjá næminginum føstum, tí tað er einki vunnið, um næmingarnir ikki hava sæð filmarnar, tá ið teir koma til undirvísingina. At tryggja sær, at næmingarnir síggja filmin og at teir vita, hvussu teir skulu hyggja og fyrireika seg, er sambært teimum, sum hava brúkt VENDA FRÁLÆRU, sera týðandi.

Í samstarvi við ein føroysklærara í einum 6. flokki eru vit farin í gongd við at framleiða nakrar mállærufilmar. Hesir filmarnir skulu vera grundarlag undir einari undankanning, sum vónandi verður grundarlag undir einari aktiónsgranskingarverkætlan av talgildum undirvísingartilfari í føroyskfrálæruni og ætlandi eisini í støddfrøðilærugreinini. Har ætla vit at leggja til rættis talgilt undirvísingartilfar grundað á vendar undirvísingarhættir og læringsstílar. Tað, vit ætla at kanna og menna, er, hvussu undirvísingargongdir skilabest verða settar saman við talgildum tilfari og talgildum læringaramboðum. Vit fara í hesi undankanning at kanna, hvussu vent flokshøli verður móttikið, og hvat og hvussu næmingarnir læra av filmunum og hvørjir læringarstílar eru gjørligir við at venda floks-hølinum. Ætlanin er eisini at fáa eina mynd av, hvussu óformlig læring kann gerast virkin í formligari læring.

Í filmsframleiðsluni hava vit higartil brúkt forritið Camtasia, serliga tí at tað hevur nógvar møguleikar og er lutfalsliga létt at ritstjórna við. Tað, sum hevur stóran týdning fyri films-framleiðsluna er, at hon er rímiliga einføld, og at ein og hvør kann sita framman fyri telduni og framleiða filmar. Í filmsframleiðsluni eru tvey viðurskifti sera týðandi. Annað er, at læringarmálið er greitt. Hitt er, at filmurin greitt leggur upp til, at næmingarnir fáa

fakligan kunnleika til at loysa uppgávur á ymsum torleikastigum og grundað á teirra egna fakliga førleika. Við støði í tonkum Jerome Bruners um, at vitan verður miðlað gjøgnum søgur, hava vit havt í huga hugsan Jerome Bruners, at: "people narrativize their experience of the world and of their own role in it" (http://oaks.nvg.org/bruner-sayings.html). Søgurnar, sum binda saman, eru reyði tráðurin í filminum, og tær skulu - við mentanargrundaðum og afturkenniligum søgum knýttum at fakligari vitan - fremja og tryggja kognitiva fakliga menning. Søgurnar eru smáir spurningar, sum børn á sama aldri seta, og svarmøguleikar, sum tey skemtandi spæla sær við. Bergmann og Sams vísa á, at tað ber væl til at brúka filmar, sum onnur hava gjørt, serliga um teir eru fakliga væl úr hondum greiddir, men teir vísa samstundis á, at teir hava royndir við, at næmingunum dámar betur, at teirra egni lærari hevur framleitt filmin, sjálvt um filmurin ikki hevur serliga góða góðsku. Teir taka fram dømi um lærara, sum hevur skrivað til teirra og sagt, at teirra filmar eru væl betri enn hansara, men næmingunum dámar betur hansara filmar (Bergmann & Sams 2014: 570). Ráðini eru sostatt at gera sínar egnu filmar og byrja í smá-um. Neyðugt er at gerast trygg/ur við tøknina og skriva handritið til filmin greitt og einfalt og síðani royna seg fram til, hvat ið virkar. Við tað at Camtasia er lætt at ritstjórna við, ber væl til at leggja afturat og taka slíkt burtur, sum ikki virkar.

Fakligi bulurin í filmunum er eitt power point, sum vit leggja rødd til. Síðani hava vit havt tvær smágentur, sum spyrja fakligar spurningar í einum skemtiligum tóna. Hesi klippini ganga aftur gjøgnum filmin og eru tikin upp við Iphone/Ipaddi. Eini ráð, sum øll, ið hava roynt seg við at gera filmar geva, er at lata skemt vera ein týðandi part av fakligu miðlanini – sjálvandi við máta, men tað siga tey flestu er sera viðkomandi fyri at halda næmingunum føstum við filmin, tí faklig miðling á filmsmiðlinum kann vera ov turrislig at hyggja ov leingi at. Somuleiðis eru ráðini, at fakliga "tættir/tungir" filmar ikki mugu verða longri enn 5-8 minuttir, men kunnu væl vera uppaftur styttri. Skemtið hava vit megnað at fingið inn í filmarnar, men verri er at gera filmarnar nóg stuttar og greiðar, so tað er størsta avbjóðingin í løtuni.

## Keldur

Bergmann, Jonathan og Sams, Aaron. 2012: *Flip your Classroom*. Eugene, Oregon, Washington, DC: Iste og Alexandra, Virginia: ASCD. Talgild útgáva.

Bergmann, Jonathan og Sams, Aaron. 2014: *Flipped learning*. Eugene, Oregon, Washington, DC: Inernational Society for Technology in Education. Talgild útgáva.

http://oaks.nvg.org/bruner-sayings.html, tikið niður 20.02.15

Kerá, Guðrun. 2014: *Hvørja ávirkan hava tilgild námsfrøði og talgildir frálærumiðlar á motivatiónina?* Yrkisrættað uppgáva á NÁD, ikki loyvd atgongd.

# Námsfrøðilig leiðsla

Olav Absalonsen

Bæði lærarar og næmingar eru partar av eini størri skipan sum til dømis skúlanum sum stovni og tí politisku skipanini. Faktorar, sum hava ávirkan á undirvísing og læring, kunnu síggjast í trimum stigum:

1. Makro stig: Útbúgvingarlig hugsjón, sosiologi og politikkur
2. Meso stig: Útbúgvingarstovnar, mentan og etos
3. Mikro stig: Samvirkan (interaktión) millum lærarar og næmingar

## Leiðsla á makro stigi

Tá ið ein hugsan er góðkend millum manna, hava vit eina hugsjón, sum politiskar avgerðir kunnu verða bygdar á. Útbúgving er at fyrireika fólk til samfelagslívið, privatlívið og arbeiðslívið. Politiskar avgerðir eru viðhvørt bygdar á hugsjónir, viðhvørt á siðvenjur, og viðhvørt eru tær kopieraðar úr øðrum londum uttan at meta um, hvussu egnaðar tær eru í viðkomandi staði. Politiskar skipanir eru í áhaldandi innanhýsis stríði, og sambært Ecclestone (2002) er altíð vandi fyri, at granskarar verða lokkaðir at umboða loysnir, sum gera verandi praksis til eina spegilsmynd av politiskum málum.

Viðhvørt kunnu politiskar ætlanir vera truplar at seta í verk, til dømis tað, at øll skulu hava útbúgving, sum kann verða gjørt við at leingja kravda skúlagongd. Tað má verða stuðlað við leiðsluháttum og undirvísingarháttum á meso og mikro stigi, tí nú skulu skúlarnir taka sær av næmingum, sum annars høvdu valt at farið úr skúlanum, og sum í nógvum førum eru øðrvísi næmingar enn teir, sum ganga í skúla av berum hugi. Tað er lætt at gera av á makro stigi at leingja kravda skúlagongd, men avbjóðingarnar hjá skúlaleiðslum og lærarum verða fleiri og størri.

Ein avbjóðing av sama slagi er, tá ið myndugleikar royna at fáa fleiri fólk inn í formliga læring[1] eftir kravda skúlagongd, har sosialar, mentanarligar og búskaparligar umstøður forða fyri tí. Hugtakið mentanarkapitalur er viðkomandi at hava í huga fyri at skilja, hvussu ung fólk taka avgerðir um karrieru. Í teoriini er talan um 'atferð, avgerðir, vitan og vanar, sum tann einstaki hevur fingið við sosialisering' (Ecclestone og Pryor 2003). Í útbúgvingarligum samanhangi kann hetta verða sett í samband við hugburðin hjá tí einstaka

[1]Læring kann vera formlig, óformlig ella non-formlig. Formlig læring er fyriskipað av einum útbúgvingarstovni. Óformlig læring er tað øvuta av formligari læring, til dømis tá ið ein av tilvild biður annan um hjálp. Non-formlig læring er hvørki formlig ella óformlig, til dømis tá ið tey lærandi sjálv skipa fyri lektiuhjálp.

til at læra og við motivatión fyri at læra. Sostatt er mentanarkapitalur ein faktorur, tá ið ung fólk velja.

Mentanarkapitalur kann verða lýstur við einum dømi. Um ein lærari megnar at fáa nemingarnar at kenna seg væl í skúlastovuni, hevur hann megnað at skapa eina fortreyt fyri læring. Men hvat gera myndugleikar á makro stigi fyri at fáa næmingar at kenna seg væl? Er tað, at teir kenna seg væl, ikki ein grundleggjandi fortreyt fyri, at teir kunnu læra nakað? Mentanarkapitalur hevur avgerandi ávirkan á, um ein næmingur kennir seg væl í einum skúlasamanhangi. Um ein næmingur regluliga fær hjálp frá foreldrum til heima-arbeiði, til dømis, so kann tað hugsast, at hann hevur meiri kapital til at taka av avbjóð-ingum, sum skúlagongdin setur, enn ein næmingur, sum ongantíð fær hjálp. Hetta er bara eitt einfalt dømi um mentanarkapital.

Mentanarkapitalur er nær knýttur at sosialisering (primerari og sekunderari), meðan sosialur kapitalur er 'tilfeingi, sum tann einstaki hevur sum limur í organisatiónum og sosialum netverki' (Ecclestone og Pryor 2003). Saman kunnu mentanarkapitalur og sosialur kapitalur geva svar upp á ójavna og ójavnar fortreytir fyri læring. Er ætlanin at fáa fleiri fólk inn í formliga læring, er umráðandi at skilja hesar treytir; og um vit skulu minka um fráfall í miðnámi, er umráðandi at skilja hesar somu treytir á meso og mikro stigi.

Hóast vit hava væl meintar ætlanir, kunnu vit samstundis hava fyrisitingarligar forðingar. Tá ið avgerðir eru tiknar á makro stigi, skal orka til at seta tær í verk, og avgerðir á makro stigi, hava ongan týdning, um tær ikki verða gjøgnumførdar á bæði meso og á mikro stigi.

## Leiðsla á meso stigi

Starvið hjá einum skúlaleiðara er sett saman av fyrisiting og námsfrøði. Transformatións-leiðsla, har 'leiðarin hevur áhuga í tørvi og motivum hjá starvsfólki og hjálpir teimum at gagnnýta síni evni til fulnar' er viðkomandi her (Northouse 2007). Ein gongd í mongum londum hevur verið, at arbeiði hjá skúlaleiðarum er flutt frá fyrisiting til námsfrøðiliga leiðslu, og í skúlum, sum klára seg væl, er undirvísing blivin ein meira kollektiv uppgáva.

Tað er samanhang ímillum leiðsluatferð øðrumegin og professionella menning, eldhuga og áhuga lærara og læring næminga hinumegin (Blase 2004). Kanning í Svøríki vísir positivt samanhang ímillum námsfrøðiliga leiðslu og til dømis hesi viðurskifti (Kåräng 1997):

- Hvussu effektivt skúlin kunnar næmingarnar
- Hvussu stóra ávirkan næmingar hava á arbeiðið í skúlanum
- Hvussu væl lærarar fylgja við menning næminga
- Møguleikar at fáa hjálp í skúlanum at loysa vandamál
- Áhugin hjá næmingum og lærarum at vera við í avgerðum

- Samstarv millum lærarar

Blase (2004) vísir á kanningar, sum stuðla uppundir tær svensku niðurstøðurnar. Nógvir granskarar vísa á professionella menning av lærarum (starvsfólkamenning), betri samskifti, menning av toymum, menning av námsætlanum og tað at integrera tað, sum lærarar krevja ella ynskja av skúlanum sum arbeiðspláss, við endamál skúlans.

Námsfrøðilig skúlaleiðsla kann virka sum eftiransan, hóast hon er samstarvssinnað. Tí er umráðandi, at skúlaleiðslan ger sær greitt, hvat málið er við teimum avgerðum og atgerðum, hon tekur, og hvussu starvsfólk fata og uppliva hesar avgerðir og atgerðir. Samskifti er alneyðugt, um samstarvið skal virka.

Professionell menning av lærarum er eitt av høvuðsøkjunum í námsfrøðiligari skúlaleiðslu. Nógv amboð kunnu brúkast í starvsfólkamenning, til dømis: at stuðla samstarvi, at menna coaching í stovninum, brúka aktiónsgransking í avgerðum, og brúka tíð, tilfeingi og møguleikar at nøkta tørvin í undirvísingini.

Blase (2004) ávarar eisini ímóti ineffektivari námsfrøðiligari leiðslu. Tað er atferð, sum vísir líkasælu ella lítlan áhuga í undirvísing og læring og manglandi námsfrøðiliga leiðslu. Hon kann eisini vera ein arrogantur atburður í samskifti við lærarar. Í báðum førum kann slík leiðsla hava skaðiliga ávirkan á lærarar, og tískil eisini á teir næmingar, sum hesir lærarar arbeiða saman við.

Effektiv námsfrøðilig leiðsla og effekktivt samskift við lærarar eru í tráð við transformatiónsleiðslu, ið er ein leiðsluteori, har leiðarin roynir at menna og inspirera starvsfólk og geva teimum avbjóðingar, og har áhugamál hjá starvsfólkum verða tikin í álvara fyri at koma fram til felags í orðingar um visión, endamál og mál. Transformatiónsleiðsla krevur ikki ein ávísan leiðslustíl, men kann útinnast á ymiskan hátt:

1. Tann karismatiski leiðarin skapar visión, virðing, álit, stoltleika og vilja, og hann deilir ein og hvønn heiður við starvsfólkini
2. Tann inspirerandi leiðarin útstrálar optimismu, og at hann væntar nógv av starvsfólkunum, og hann setir greið mál, sum eru realistisk
3. Tann intellektuelt stimulerandi leiðarin stuðlar intelligentum hugsanarhátti, rationaliteti og umhugsan, áðrenn avgerðir verða tiknar
4. Tann individuelt umhugsandi leiðarin gevur tí einstaka starvsfólkinum ans.

Blase (2004) førir fram, at sjálvt transformationellir stjórar og lærarar hava trupult við at orða felags visiónir og endamál, sum skulu til fyri at bøta um læring næminga. Hesir trupulleikar kunnu partvíst forklárast við tí , sum Schein (1996) kallar 'learning disabilities'. Tað er torført at viðgera hugsanina um, at ein organisatión lærir, tí læring er eitt

individualistiskt hugtak úr sálarfrøði, har tað er væl viðgjørt og lýst, og enn eru vit ikki før fyri at greiða frá, hvat tað merkir, at ein organisatión lærir. Sambært Blase (2004) eru hesar forðingar at læra helst verri í skúlum enn í øðrum organisatiónum, tí tann vanliga mentanin í einum skúla ger tað torført hjá lærarum at síggja seg sjálvar sum lærandi. Schein definerar mentan sum: 'eitt sett av felags, sjálvsøgdum, implisittum meiningum, sum ein bólkur hevur, og sum ger av, hvussu bólkurin uppfatar umheimin, hvat hann heldur um umheimin, og hvussu hann ber seg at í sambandi við umheimin.'

Mentan er ein tann sterkasta og mest lívsseiga kraftin í einari organisatión, og tað er meira sannlíkt, at mentanin broytir leiðarar, enn at leiðari broytir mentanina. Sambært Schein skuldu leiðarar og lærarar tí sæð skúlan sum 'eina samansetta skipan við nógvum mótstríðandi sjónarmiðum'. Visión, endamál og mál, ið eru orðað av leiðarum, fáa ikki undirtøku millum starvsfólk, um mentanarligar kreftir ikki verða virdar, tí limir í einari mentan eru ikki greiðir yvir sína egnu mentan, fyrr enn teir møta eini aðrari mentan. Tí skuldu ikki bara næmingar, men eisini stjórar og lærarar verið førir fyri at sæð seg sjálvar sum lærandi fyri at læra at samstarva og arbeiða ímóti felags málum.

## Leiðsla á mikro stigi

Mikro stig er samvirkan og samstarv ímillum lærara og næmingar, sum mugu liva við avgerðum, ið eru tiknar á hægri stigum, og lærarin hevur ábyrgdina av at seta tær í verk. Lærarin hevur eina námsætlan at halda seg til. Har eru endamál við lærugreinunum lýst, og førleikamálini eru ásett. Við hesum treytum møtir lærarin næmingunum sum leiðari, ið skal fáa samstarv í lag við næmingarnar. Men næmingarnir kenna í fyrstu atløgu einki til endamál og førleikamál. Ein hugburðskanning, sum varð gjørd á Føroya Handilsskúla í 2008, vísti, at lærarar og næmingar hava ikki felags mál ella ikki nóg nógv, og tað tarnar samstarvinum, undirvísingini og læringini. Eg spurdi næmingar í tveimum fyrsta árs flokkum 17 spurningar um viðmerkingar, rós og karakterir í afturmeldingum frá lærarum um skrivlig avrik. Og 16 lærarar fingu somu spurningar. Spurningarnir vóru orðaðir sum útsagnir, og so vóru 5 svarmøguleikar:

- Púra samd
- Samd
- Ivist
- Ósamd
- Púra ósamd

Talvan niðanfyri vísir, hvussu næmingarnir og lærararnir svaraðu. Samd/ivist merkir, at ein stórur meiriluti av bólkinum hevur svarað púra samd, samd ella ivist. Ógreitt merkir,

at bólkurin er meira spjaddur. Púra samd er roknað upp í samd, og púra ósamd er roknað upp í ósamd.

Í sambandi við rós svaraðu næmingar og lærarar á sama hátt uttan í fyrsta spurningi, og tað kundi bent á, at lærarar og næmingar spæla ikki eftir heilt somu reglum, og at lærarar eru bleytir, við tað at teir vilja finna okkurt at rósa, meðan næmingar ivast í, um lærarar skulu gera tað. Hesin munur í hugburði kann vera ein forðing í samvirkan ímillum lærara og næmingar. Spurningur 2 og 4 eru um tað sama, og skuldu teir givið sama svar.

**Talva 1: Hugburður hjá næmingum og lærarum til rós, viðmerkingar og karakterir, Føroya Handilsskúli mai 2008**

| Evni | Spurningur | Næmingar | Lærarar |
|---|---|---|---|
| Rós | 1. Tað er altíð umráðandi at finna okkurt at rósa | Ivast | Samd |
| | 2. Rós fyri vánaligt avrik gevur eina falska kenslu av trygd | Samd | Samd |
| | 3. Rós fyri gott avrik er ikki neyðugt | Ósamd | Ósamd |
| | 4. Rós fyri vánaligt avrik minkar um trúvirðið hjá læraranum | Samd | Samd |
| Við-merkingar | 5. Viðmerkingar við karakteri og/ella rósi er ein góð samanseting | Samd | Samd/ivast |
| | 6. Um næmingar fáa karakter, hava viðmerkingar minni áhuga | Ógreitt | Ógreitt |
| | 7. Viðmerkingar skulu lagast til næmingin | Samd | Samd |
| | 8. Viðmerkingar virka betur uttan karakterir ella rós | Samd/ivast | Ivast |
| | 9. Tað er umráðandi at kenna næmingin, sum viðmerkingarnar eru til | Samd | ógreitt |
| Karakterir | 10. At fáa karakterir er motiverandi | Samd | Ivast |
| | 11. Góðir karakterir gera, at næmingurin kennir seg góðkendan | Samd | Samd/ivast |
| | 12. Góðir karakterir fáa næmingin at kenna seg tryggan | Ógreitt | Samd |
| | 13. Næmingar síggja karakterir sum nakað persónligt | Ógreitt | Samd |
| | 14. Vánaligir karakterir gera, at næmingurin kennir seg vrakaðan | Ógreitt | Samd |
| | 15. Vánaligir karakterir fáa næmingin at taka seg saman | Samd | Samd/ivast |
| | 16. Næmingar seta karakterir í samband við avrik og ikki egoið | Samd | Samd/ivast |
| | 17. Karakterir áttu ikki at verið givnir fyrr enn við skúlaárslok | Ósamd | Ógreitt |

Kelda: Egið tilfar 2008

Í spurningunum um viðmerkingar er logiskt samanhang ímillum spurning 5, 6 og 8, og eitt annað ímillum spurning 7 og 9. Tað er rímiligt, at næmingarnir eru samdir í bæði spurningi 7 og í 9, tí um viðmerkingar skulu lagast til næmingin, er umráðandi at kenna næmingin. Ein meiriluti av lærarunum eru samdir í spurningi 7, men ikki í spurningi 9; tað kann koma av, at teir seta meira fokus á uppgávuna enn á næmingin, og hóast teir halda, at viðmerkingarnar skulu lagast til næmingin, so er ikki so umráðandi at kenna hvønn næming, tá ið viðmerkingar verða skrivaðar.

Ein hevði væntað øvut svar til spurning 5 og til spurning 8, men hvørki næmingar ella lærarar gera tað. Tað er lættari at skilja lærararnar her, tí hjá teimum er *ivast* við í svarunum til báðar spurningarnar, enn næmingarnar, sum hava samd í svarunum til bæði spurning 5 og 8. Hetta kann møguliga forklárast við mátanum, sum spurt verður, tí báðar útsagnirnar kunnu ljóða 'rættar'. Spurningur 6 hevur ikki henda eginleika, og hjá báðum bólkum er hetta ógreitt, sum eisini vísir, at næmingar eru ymiskir í hugburði. Spurningur 5 og 8 eru um viðmerkingar, karakterir og rós, men spurningur 6 er bara um viðmerkingar

og karakterir. Tað ger spurning 5 og 8 nakað ógreiðar at svara, tí ein karakterur er ofta eitt tal og tí rættiliga ítøkiligur, meðan rós er meira abstrakt sum hugtak, og tað verður ofta skrivað inn í viðmerkingarnar, og ætlanin at rósa er kanska ikki altíð fatað sum so av næminginum; hinvegin kann ein viðmerking verða fatað sum rós, sjálvt um tað ikki var ætlanin.

Tá ið vit koma til partin um karakterir, hava næmingar og lærarar sum bólkar ikki sama hugburð til nakran av teimum 8 spurningunum. Spurningur 10 og 17 eru um tað sama, og samsvar er í svarunum frá næmingunum her, tí um karakterir eru motiverandi, so skulu teir verða givnar alt árið. Flestu lærarar ivast í, um karakterir eru motiverandi, og helvtin av teimum ivast eisini í, um karakterir ikki skulu verða givnir fyrr enn við endan á skúla-árinum. Spurningur 12 og 15 snúgva seg eisini um motivatión: ein meiriluti av næming-unum heldur, at lágir karakterir gera, at teir fara at taka seg saman, men teir eru meira ymiskir á máli, hvørt góðir karakterir fáa teir at verða róligar. Ein meiriluti av lærarunum heldur, at góðir karakterir gera næmingarnar róligar, men bara ein minniluti trýr, at lágir karakterir fáa næmingarnar at taka seg saman.

Spurningur 11, 13, 14 og 16 eru um karakterir og egoið. Ein meiriluti av næmingunum sigur, at góðir karakterir gera, at teir kenna seg góðtiknar, men bara ein minniluti sigur, at lágir karakterir gera, at teir kenna seg vrakaðar. Ein meiriluti av lærarunum heldur, at lágir karakterir gera, at næmingar kenna seg vrakaðar, men bara ein minniluti heldur, at góðir karakterir gera, at teir kenna seg góðtiknar. Flestu næmingar seta karakterir í sam-band við avrik og ikki við persónin, men bara helvtin av lærarunum ger tað. Næmingarnir eru spjaddir í spurninginum, um karakterir eru persónligir, men flestu lærarar halda, at næmingar sum heild taka karakterir persónliga.

Hóast spurnarblaðið bara hevur eina dimensión, og spurningar kunnu vera tvítýddir, tí fleiri dimensiónir eru í summum spurningum, so hevur hugburðskanningin avdúkað hesar staðfestingar:

- Tað er munur á tí, sum næmingar halda, og tí, sum lærarar halda um við-merkingar, rós og karakterir í afturmeldingum til avrik.
- Tað eru ymsar fatanir ímillum næmingar og ímillum lærarar um viðmerkingar og karakterir í afturmeldingum til avrik.

Hesar staðfestingar undirbyggja niðurstøðuna um at eginmeting og næmingameting eru veikar í skúlanum, og tað er vert at vita hjá leiðslu á bæði mikro og meso stigi. Felags mál og betri fatan ímillum næmingar og ímillum lærarar krevjast, um meting fyri at læra skal eydnast.

Lærarar eiga at síggja seg sjálvar sum leiðarar í størri mát, enn nógvir gera, og til at byrja hesa broyting í hugsanarhátti krevst námsfrøðilig leiðsla. Átakið at skapa opinleika um ársmet[2] er eitt stig tann vegin, tí tey ógreiðu viðurskiftini á hesum øki gjørdu, at næmingar sóu læraran sum valdsharra við mystiskari makt. Autonomi í læring er at hava ávísar førleikar at taka ábyrgd av egnari læring. Um næmingar skulu gerast autonom lærandi, sum er eitt av aðalmálunum á miðnámi, mugu teir læra seg eginmeting, sum er at meta um seg sjálvan og egin avrik. Til at læra eginmeting krevst samstarv við lærarar um felags mál, og lærarar eiga at átaka sær leiklutin sum transformatiónsleiðarar. Næmingameting, sum er tað, at næmingar meta aðrar næmingar, kann vera ein partur av læringsumhvørvinum, og hon hevur nøkur eyðkenni, sum samvirkan ímillum næming og lærara ikki hevur: lærarin hevur ofta leiklutin sum ein myndugleiki, og fleiri næmingar eru ikki nóg áhaldandi í samskifti við læraran. Tí kann samvirkan ímillum næmingar føra til meiri læring fyri summar næmingar. Av tí at næmingar í einum flokki eru sera ymiskir, er neyðugt við næmingameting og eginmeting afturat lærarameting fyri at stuðla fleiri næmingum í flokkinum.

Undir verandi umstøðum er lívlong læring eitt hugtak við ongum innihaldi. Vit vita einki um varandi læring, fyrr enn mong ár eftir, at næmingurin er farin úr skúlanum, og gransking bendir á, at undirvísing fyri tað mesta hevur stuttskygd mál. Á miðnámi vilja næmingarnir hava góðar karakterir fyri at hava fleiri møguleikar eftir miðnám. Hesin hugburður er meira vanligur ímillum næmingar enn ímillum lærarar, men kanningar vísa, at lærarar flest undirvísa fram til eina próvtøku. Langtíðarmál eru kanska til, men tey eru ikki serliga sjónsk. Málið at tilogna sær førleikar at blíva ein autonomur lærandi verður køvt av málinum at fáa góðar karakterir, sum geva atgongd til víðari útbúgving ella starv.

## Keldur

Absalonsen, O. 2008. Teaching as Leading: Enhancing Asessement for Learning, The Robert Gordon University, Aberdeen.

Baker III, G., Roueche, J., Gillett-Karam, R. 1990. Teaching as Leading: Profiles of Excellence in the Open-Door College, Washington D.C.: The Community College Press.

Blase, J., Blase, J. 2004. Handbook of Instructional Leadership: How Successful Principals Promote Teaching and Learning, second edition, Thousand Oaks, Califorina: Corwin Press.

Ecclestone, K. 2002. Learning Autonomy in the Post-16 Education: The Politics and Practice of Formative Assessment, London: Routledge-Falmer.

[2] Sí grein undir heitinum *Ársmet og opinleiki* í Miðnámsriti nr. 4, desember 2014.

Ecclestone, K., Pryor, J. 2003. 'Learning Careers' or 'Assessment Careers'? The Impact of Assessment Systems on Learning, British Educational Research Journal, Vol. 29, No. 4, pp. 471-488.

Kåräng, G. 1997. Pedagogisk ledarskap. Korrelationsundersökningar inom Skolverkets nationella utvärderingar av grundskolan 1992 och 1995, Pedagogisk Forskning i Sverige, årg. 2 nr. 4 s. 263-278.

Schein, E. 1996. Culture: The Missing Concept in Organizational Studies, Administrative Science Quarterly, Vol. 41. No. 2, pp. 229-240.

# Skúli ella skrímsl

Rógvi Olavson

**Í sambandi við at skúlin í Marknagili nú verður bygdur, viðger henda grein týdningin av at vera tilvitaður um endamálið við skúladeplinum.**

Søgnin sigur, at Elijah Ba'al Shem, ein rabbinari í polska býnum Chelm í 16. øld, skapti ein sokallaðan Golem[3] úr leiri, sum skuldi ganga honum til handa. Hesin tænti rabbinaranum í eina heila viku, men tá ið hann sá, at skapningurin vaks seg størri og størri, fór Shem at ræðast, at hann skuldi leggja alheimin í oyði, og gjørdi tí av at beina fyri honum aftur. Jødisku sagnirnar um Golem-manandi rabbinarar góvu seinni íblástur til kendu søguna um Frankenstein.

Tá ið ein organisatión verður stovnað, er tað altíð við einum umhugsaðum endamáli. Fyri at siga tað so banalt sum gjørligt, verður ein organisatión ongantíð til av tilvild. Ein íborin eginleiki hjá organisatiónini er, at hon setir greið mørk millum seg sjálva og umheimin. Organisatiónin verður til gjøgnum inkludering og ekskludering, har gjørt verður av, hvat hoyrir organisatiónini til, og hvat hoyrir umheiminum til. Hesin skilnaðurin verður framdur fyri at røkka endamálinum. Til dømis verður ein fyritøka (ofta) stovnað fyri at vinna pening, ein almennur stovnur (onkuntíð) fyri at veita borgarum eina tænastu, og alskyns áhugabólkar og felagsskapir verða stovnaðir við endamálinum um at gera samfelagið ella heimin til eitt betri stað.

Tá ið organisatiónin hevur livað eina tíð, sleppur hon illa undan, at upprunaendamálið skeiklast og broytist munandi. Feskasta dømi um hetta er Eik Banki, sum í 1832 varð settur á stovn sum "fólksins peningastovnur," men sum fá ár framman undan krakkinum í 2010 hevði broytt identitet frá almannagagnligum sparikassa til framfýsnan íløgubanka.

Silo-sinnalagið, sum leingi hevur livað millum føroysku miðnámsskúlarnar og miðnámsskúlaútbúgvingarnar, er eitt annað dømi um, at aðalendamálið: at veita unga ættarliðnum borgara-uppalandi førleika og vitan til víðari lærdóm, verður gloymt í royndini at framhevja eina fiktiva gjógv ímillum, til dømis, eina studentaskúlaútbúgving og eina hægri handilsskúlaútbúgving ella fiskivinnuskúlaútbúgving.

Hesin mentaliteturin, sum frá antrolopologiskum sjónarhorni best kann lýsast sum nútímans stammumentan, livir eisini feitur og fregin í útbúgvingarstovnum uttanlands. Fólk,

---

[3] Ein Golem er ein skapningur úr lívleysum tilfari, ofta úr steini ella leiri, sum verður livandi við gandi. Orðið verður ofta brúkt sum metaforur fyri eina fávitskuta veru, sum tænir menniskjum undir ávísum umstøðum, men sum kann vera vandamikil undir øðrum umstøðum. Á Yiddish menti orðið seg til *goylem*, sum sipar til ein, ið er klossutur ella seinur.

sum skulu eitast at vera lærd, hava ofta lyndi til at framhevja sína egnu akademisku námsgrein sum heilaga bollan innan útbúgving og samfelagsmenning. Ein blindur blettur mennist orsakað av áralangari spesialiering innan eina ávísa lærugrein, og viðførir alt ov ofta eitt slag av ontologiskum snobbaríi, har ”mín” lærugrein sigur meira um tilveruna enn ”tín” lærugrein. Hetta minnir ikki sørt um, tá ið vit sum óvitar kegladust um, hvør átti flottastu súkkluna í grannalagnum. Okkara ”klókastu” heilar eru harvið minst líka freistaðir av stammumentanini sum øll onnur.

Hugtakið autopoiesis, sum týski sosiologurin Nicklas Luhmann hevur lænt úr lívfrøðini, er ivaleyst eitt av einfaldastu amboðunum í royndini at greina og basa stammumentanini, sum so ofta krýpur inn í eina sosiala skipan ella organisatión, aftaná at hon hevur livað eina tíð. Autopoiesis sipar til eina støðu, har ein vera læsir seg um sína egnu menning; tað vil siga, at hon er merkt av einum sjálvtilvísandi (ella sirkulerum) samskifti, tí hon framleiðir sjálv teir partar, sum hon er sett saman av.

Ein organisatión kann ongantíð liva púra óheft og uttan nakað íkast frá umheiminum, men í autopoietisku organisatiónini verður alt samskifti við umheimin lagað eftir teimum skipanum, sum organisatiónin sjálv hevur bygt upp. Í stuttum - og so einfalt sum gjørligt - kann sigast, at objektivi og "veruligi" umheimurin, sum organisatiónin ikki hevur atgongd til, verður koyrdur ígjøgnum eina uppfatanarliga kjøtmaskinu, soleiðis at organisatiónin sjálv kann tilevna, hvussu umheimurin skal síggja út innanífrá.

Luhmann vildi vera við, at allar sosialar skipanir (eins og lívfrøðiligar verur) eru autopoietiskar – at hetta er eitt grundleggjandi eyðkenni við øllum organisatiónum, og at jú størri og fløkjasligari organisatiónin er, jú betur er hon før fyri at møta avbjóðingum úr umheiminum.

Hvat kunnu vit so brúka hetta háteoretiska sjónarhornið til? Ein størri tilvitska um fyribrigdið autopoiesis kundi lagt upp fyri einari gongd, har organisatiónin mennir seg á sama hátt sum skrímslið hjá rabbinaranum í Chelm, har upprunaendamálið ikki longur leiðbeinir atburðin og menningina hjá organisatiónini; tá ið tað evsta endamálið, sum var atvoldin til, at organisatiónin bleiv til av fyrstan tíð, verður sett til síðis, og yvirlivilsi, og harvið vøkstur, verður málið í sjálvum sær.

Um vit leggja til merkis, hvussu organisatiónir lata seg sjálvar aftur til tess at stýra síni egnu menning, og til tess at tilevna sína egnu umheimsuppfatan, eru vit eisini nógv betur før fyri at leggja til merkis, tá ið ein organisatión hevur gloymt, *hví* hon er til, og leggur einamest dent á at tryggja egnan eksistens fyri ein og hvønn prís.

Hóast Marknagilsdepilin ikki er formliga stovnaður enn, so hevur bygningsverkið, sum tekur seg upp í Marknagili, við sær, at henda (eftir føroyskum mátistokki) risa útbúgvingarorganisatión longu er blivin veruleiki í hugaheiminum hjá okkum øllum, serliga hjá teimum, sum starvast innan miðnám. Men vit mugu ansa væl eftir, at tað, sum vit longu vænta okkum av útbúgvingarstovninum, ikki er ávirkað av somu stammumentan, sum í áratíggir hevur sett dám á miðnámsskúlalandslagið.

Vit mugu halda rimmarfast um endamálið við nýggja bygninginum, og nýggja útbúgvingarbygnaðinum: at betra um okkara evni at útbúgva unga ættarliðið á skilagóðan hátt. Lærarar og starvsfólk eru týdningarmiklir partar av miðnámsskúlaverkætlanini, men tað eru næmingarnir einsamallir, sum eru orsøkin til, at nýggi miðnámsskúlin verður til.

Ætlanin er, at Marknagilsdepilin fyrst og fremst skal útbúgva fólk. Um eitt sekundert endamál er, at Marknagildepilin skal vera eitt gott arbeiðspláss hjá lærarum og øðrum, so er hetta *bara* til tess at røkka endamálinum at skapa eitt stimulerandi umhvørvi fyri næmingar. Afturat undirvísing og fyrisiting hava tey, sum fara at starvast í skúladeplinum, eina áhaldandi ábyrgd av, at upprunaendamálið framvegis er høvuðsendamálið; eisini langt aftaná at nýggi miðnámsskúlin er farin at klekja pisur.

# HF skeið í Klaksvík í meiri enn 40 ár

Jóannes A. Hansen

**Á sumri í 2014 vóru 40 ár liðin síðani, at farið varð undir HF útbúgving í Klaksvík. Hóast ágangurin onkuntíð hevur verið stórur, og ætlanir hava verið um at niðurleggja skeiðið ella flyta tað úr Klaksvík, so livir Klaksvíkar HF skeið framvegis sítt fríska lív.**

Fyrsta próvtøkan var á sumri í 1976, og fram til og við á sumri í 2014 vóru 720 prógv útskrivað, og harumframt eru tey mong, sum hava lokið eina ella fleiri lærugreinar.

HF skeiðið var fyrsti møguleikin at taka gymnasialt miðnámsprógv í Klaksvík og yvirhøvur uttanfyri høvuðsstaðin, og søgan um skeiðið er søga um, hvussu tað ofta hevur eydnast við frambrotum í Føroyum, uttan at formligu fyrireikingarnar hava verið víðar og drúgvar frammanundan, at farið er undir átakið.

Dømini eru mong um tey, sum ongantíð høvdu ímyndað sær, at tey skuldu taka fult prógv, men sum so eftir lestur í trý ella kanska fýra ár, meðan tey hava røkt arbeiði og havt ábyrgd fyri familju og heimi, væl nøgd hava staðið í føroyskum búna og undir eyðkendu húgvuni og við prógvi í hondini.

Eitt, sum eyðkennir Klaksvíkar HF skeið, er, at talan hevur verið og er um lítið, tætt og hugnaligt umhvørvi. Tað hevur alla tíðina verið stutt millum lærarar og næmingar og til leiðsluna.

Tað ber til at vísa á fleiri, sum fóru undir lestur á HF skeiðnum, og sum nú eru læknar, prestar ella juristar ella hava aðra akademiska útbúgving, og sum hava gjørt seg galdandi í samfelagnum, um tað so hevur verið í vinnulívi, umsiting ella politikki.

Uttan iva høvdu hesi farið aðrastaðni at nomið sær útbúgving, um tilboðið ikki var í Klaksvík. Tí er tað ikki minni áhugavert at vísa á øll tey mongu, sum fóru undir lestur á HF skeiðnum, og sum eftir at hava lokið prógv eftir miðal langar útbúgvingar, komu aftur til heimbýin og lokaløkið, har tey eru við til at lyfta, bæði í arbeiði og í lokala økinum sum heild. Her verður hugsað eitt nú um sjúkrarøktarfrøðingar og aðrar útbúgvingar innan heilsuverkið, lærarar, pedagogar, banka- og sparikassafólk, sosialráðgevar, handverkarar, skrivstovufólk, maskinmeistarar og tey við nautiskari útbúgving.

## Formligu ásetingarnar

Tá ið tað í august 1974 varð farið undir HF frálæru í Hoydølum, í Suðuroy og í Klaksvík vóru formligu karmarnir kring útbúgvingina ikki komnir upp á pláss. Tann 15. mars 1974

legði Asbjørn Joensen vegna landsstýrið uppskot til samtyktar fyri tingið um HF-undirvísing í Føroyum (løgtingsmál nr 110/1973):

Landsstýrið heitti á løgtingið um at taka undir við, at HF-undirvísing varð stovnað frá skúlaárinum 1974/75, og at landsstýrinum varð veitt heimild til at samráðast við ríkismyndugleikarnar um hesa skipan (hetta var, áðrenn umsitingin av studentaskúlanum varð yvirtikin í 1979).

Í viðmerkingunum segði landsstýrið, at uppskotið um at stovna HF-undirvísing í Føroyum var gjørt fyri ein part av ynski um at gera læraraútbúgvingina á Føroya Læraraskúla betri, og fyri ein part av ynski um at geva teimum, sum hava verið úti í vinnulívinum, eitt nýtt útbúgvingartilboð, um tey ynskja at fara undir víðari útbúgving, serliga á tí bókliga økinum.

Og í viðmerkingunum verður eisini sagt soleiðis: “Í hesum sambandi kann upplýsast, at landsstýrinum kunnugt fáa í løtuni 25 føroyingar HF-útbúgving í Danmark. Fyribils samráðingar hava verið við “direktoratet for gymnasieskolerne og HF-undervisningen”, og úslitið av hesum samráðingum er, at grundarlag er fyri at stovna HF-flokkar við studentaskúlan í Hoydølum, og at møguligt er í ein vissan mun at seta HF-undirvísing í verk sum undirvísing í einstøkum lærugreinum á bygd. Í hesum sambandi verður gjørt vart við, at treytirnar fyri at seta HF-undirvísing í verk eru: 1. nóg stórt næmingatal, 2. hóskandi høli og 3. lærarar, sum eru førir fyri at røkja undirvísingina.”

Skúlanevndin hjá løgtinginum mælti eftir fyrstu viðgerð tinginum til at samtykkja uppskotið, og 5. apríl 1974 samtykti løgtingið uppskotið frá landsstýrinum óbroytt við aðru og endaligu viðgerð við atkvøðunum 20-0.

Við hesum formliga grundarlagið varð í august 1974 farið undir HF-útbúgvingina í Hoydølum, Suðuroy og í Klaksvík.

Formligu karmarnir komu upp á pláss tvey ár seinni – stutt undan próvtøkuni hjá fyrsta árganginum. Tá samtykti løgtingið lógina, og nakrar dagar seinni lýsti landsstýrið kunngerðina. Tað gekk soleiðis fyri seg:

Tann 13. desember 1975 legði Finnbogi Isaksen vegna landsstýrið uppskot fyri tingið um løgtingslóg um Føroya Studentaskúla og HF-skeið (løgtingsmál nr. 46/1975). Í grein 1 og stykki 2 verður sagt, at eftir avgerð landsstýrisins kunnu deildir av Føroya Studentaskúla og HF skeiði setast á stovn. Hetta var lógarheimildin fyri at seta HF skeið í Klaksvík og í Suðuroy á stovn.

Umframt lógina um Føroya Studentaskúla og HF-skeið, sum millum annað snúði seg um bygnaðin og leiðslu (I), vóru í uppskotinum lóg um studentspróvtøku (II) og løgtingslóg um hægri fyrireikingarprógv (III).

Lógin um HF-próvtøku varð skotin upp at galda frá 1. august 1974, og at hægri fyrireikingarpróvtøka skuldi vera fyrstu ferð á sumri 1976, skeyt landsstýrið upp fyri tinginum.

Í viðmerkingunum til uppskotið segði landsstýrið, at grundarlagið undir verandi HF-frálæru í Føroyum var samtyktin frá 5. apríl 1974 í løgtingsmáli nr. 110/1973: HF-undirvísing í Føroyum, har tingið tók undir við uppskoti landsstýrisins til samtyktar um, at HF-frálæra varð sett á stovn í Føroyum frá skúlaárinum 1974/75 og gav landsstýrinum heimild at samráðast við ríkismyndugleikarnar um hesa skipan.

Uppskotið varð samtykt við 3. viðgerð 7. apríl 1976, og 30. apríl varð kunngerðin um hægri fyrireikingarpróvtøku lýst.

Møguleikin at taka miðnám aðra staðni enn í høvuðsstaðnum var væl fagnaður kring landið. Longu tá var ynskið millum unga fólkið um bókliga útbúgving stórt. Tað hevði við sær vanda fyri, at fráflytingin til høvuðsstaðin og av landinum varð vaksandi, og kommunalu myndugleikarnir og skúlamyndugleikarnir kring landið gjørdu sítt til at ávirka, at møguleikin fyri at útbúgva seg kring landið varð størri.

Í uppskotinum til samtyktar, sum løgtingið samtykti í 1975, vóru tríggjar treytir nevndar sum avgerandi, um ætlanin at seta HF-útbúgving á stovn skuldi verða veruleiki – nóg nógvir næmingar, nóg góð høli og nóg dyggir undirvísarar.

## Næmingarnir

Tann fyrsta var, at næmingatalið var nóg stórt. Í Klaksvík var hetta ikki nakar trupulleiki fyrsta árið. Longsulin eftir heimstaðnum var so stórur, at onkrir klaksvíkingar, sum vóru farnir undir lestur í Hoydølum í 1973, góvust eftir 1. s og fluttu norður aftur fyri at vera partur av fyrsta árganginum í nýggja HF skeiðnum.

Fyrsti árgangurin var væl mannaður flokkur, og tá ið tey høvdu lisið í tvey ár og fóru til próvtøku, vóru tey nítjan, sum luku fult prógv. Annað árið kendist tað vera torførari at liva upp til fyrstu politisku treytina, tí í 1977 vóru tey ikki fleiri enn níggju, sum luku prógv.

Næstu árini vísti hetta seg ikki at vera trupulleiki. Talið á prógvum er ongantíð farið niður um tíggju aftur, og tveir árgangir hava verið so mikið stórir, at tað var neyðugt við tveimum flokkum.

## Hølini

Onnur treytin var, at hóskandi høli vóru tøk til undirvísingina. Hóskandi høli er vítt hugtak. Eitt er at hava tak yvir høvdið, og annað er at vera í hølum, har amboð og tilfar er tókt til allar lærugreinar. Soleiðis var tað ikki, tá ið Klaksvíkar HF skeið í august 1974 bjóðaði fyrstu næmingunum at fara undir lestur, og tað ber ikki til at siga, at tað nakrantíð fult og heilt hevur verið soleiðis í tey meiri enn fjøruti árini, sum skeiðið hevur verið til. Men við góðum vilja og stórum hugflogi hevur tað gingið.

Í meira enn eitt ár helt fyrsti árgangurin til í bygninginum hjá Klaksvíkar Sjómansskúla við Garðavegin. Umframt at hýsa skipara-, telegrafist- og kokkaútbúgving helt bókasavnið eisini til har. Tað var so mikið trongligt, at ikki bar til at hýsa næsta árganginum, sum fór undir lestur í august 1975. Hesi hildu fyrstu vikurnar til í bygninginum, sum Tekniski skúli í Klaksvík í 1953 flutti inn í.

Fyri at finna meira permanenta fyribilsloysn, varð bygningur leigaður við Klaksvíksvegin í Víkunum. Talan var um fyribils loysn, men síðani hevur HF skeiðið hildið til her. Hóast bygningurin varð bygdur fyrst í sjeyti árunum og harvið var nýggjur, tá ið HF skeiðið flutti inn, so var bygningurin ikki teknaður at vera skúlabygningur. Í veghæddini var klædnahandilin Norðtex og seinni málingahandilin Iris, men seinastu stóru fjórðingsøldina hevur tað bara verið HF skeiðið, sum hevur verið undir lonini.

Í fyrstuni varð bygningurin leigaður frá privata eigaranum Eskildi Norðbúð. Tann 16. november 1981 legði Eilif Samuelsen vegna landsstýrið fram uppskot til løgtingslóg um lán til keyp av ognini. Í viðmerkingunum varð sagt, at landsstýrið eftir tilmæli frá Landsskúlafyrisitingini í samráð við fíggjarnevnd Føroya Løgtings hevði samtykt at keypa ognina. Skúlanevndin viðgjørdi málið og mælti til at taka undir við uppskotinum. Málið varð samtykt við 2. viðgerð og við 3. viðgerð sama dag. Bygningurin er framvegis ogn hjá landsmyndugleikunum. Serhølir til alisfrøði, evnafrøði og lívfrøði vórðu innrættað, meðan aðrar lærugreinar ongantíð fingu serhøli – eitt nú tónleikur og landafrøði.

Óvissan um framtíðina hjá skeiðnum er ivaleyst høvuðsorsøkin til, at bygningurin als ikki er hildin og harvið á ongan hátt er nakað prýði. Nú er tað greitt, at HF skeiðið eftir summarfrítíðina 2015 fer at flyta í nýggj høli í Tekniska skúla í Klaksvík.

## Leiðsla og lærarar

Tað var stór avbjóðing at vinna á triðju treytini fyri at seta HF skeið á stovn – at finna skikkaðar undirvísarar. Meðan tað í omanfyri nevndu lóg frá 1976 var grein, sum ásetti førleikakrøvini til lærararnar, ið undirvístu í studentaskúlanum, so var henda greinin ikki

við í lógini fyri HF skeið. Krøvini at undirvísa studentaskúlanæmingum vóru kandidatsprógv á universiteti ella magistaraprógv, og fyri at verða settur í fast starv var kravið roynd í teoretiskum og praktiskum pedagogikki.

Hóast hetta ikki var krav í HF lógini, so varð strembað eftir, at tey, sum vórðu sett í starv, høvdu kandidatútbúgving frá lærdum háskúla.

Klaksvíkar HF skeið var partur av Føroya Studentaskúla og HF skeiði. Harvið var tað rektarin í Hoydølum, sum hevði formligu ábyrgdina av undirvísingini og próvtøkunum. Lærarar úr Hoydølum ferðaðust fyrstu árini einstakar dagar til Klaksvíkar at undirvísa, og viðhvørt vóru næmingarnir úr Klaksvík í Hoydølum fyri at fáa undirvísing, eitt nú at gera royndir. Í øðrum førum vóru tað fólkaskúlalærarar, sum tóku sær av undirvísingini, meðan tað vóru lærarar í Hoydølum, sum høvdu formligu ábyrgdina og stóðu fyri próvtøkunum. Eisini tá vóru teir í Hoydølum einstakar dagar í Klaksvík og undirvístu.

Millum teirra, sum undirvístu fyrstu árini, og sum búðu í Klaksvík, vóru Johnny Thomsen, sum var leiðari, Agnar á Dul, sum hevði búskaparliga útbúgving, Símun Pauli Kunoy, sum var verkfrøðingur, Bogi Lützen, musikkskúlalærari, Hans Dávid Matras og Bjarni Jacobsen, sum vóru fólkaskúlalærarar, og Jacob Magnussen og Henning Bøgesvang, prestar. Bette Rasmussen, sum av aldri var farin úr starvi í høvuðsstaðnum, var nakrar mánaðir í føðistaðnum og undirvísti.

Eftir Johnny Thomsen tók Helle Heinesen við sum leiðari, og hon setti rættiliga dám á bæði skúlan og lokala samfelagið, inntil hon 3. februar 1986 doyði bara 43 ára gomul. Eftir at Helle var farin, tók Bo Jørgensen við sum leiðari. Hann og konan, Margit Dahl Nielsen, vóru komin til Føroya í 1983. Sigrun Skálagarð tók við leiðarastarvinum í 1995, og hon er framvegis leiðari.

Í 1980 var HF skeið sett á stovn við Gøtugjógv. Hetta var partur av HF skeiðnum í Klaksvík. Tvey ár seinni, í 1982, varð Studentaskúlin í Eysturoy settur á stovn. Um henda skúlan hevur Kári Nolsøe Olsen skrivað grein. Fyri Klaksvíkar HF skeið bar nýggi skúlin við sær, at ábyrgdin fyri skúlanum varð flutt úr Hoydølum og til rektaran við Gøtugjógv.

Arnbjørn Mortensen var øll árini, meðan HF skeiðið í Klaksvík var partur av Føroya Studentaskúla og HF skeiði, rektari í Hoydølum. Í 1982 varð Sámal í Skorini útnevndur at vera rektari í Eysturoy. Frammanundan hevði hann í eitt stutt skifti verið lærari á HF-skeiðnum í Klaksvík, sum hann nú fekk ábyrgdina fyri. Síðani í apríl 2011 og fram til í februar 2015 var tað Helga Foldbo, sum hevði høvuðsábyrgdina. Eftir Helgu Foldbo tók Páll Isholm við sum fyribilssettur rektari í Eysturoy og harvið ábyrgdarmaður fyri skeiðið í Klaksvík.

Síðani 1982 hava lærarar ferðast millum Eysturoy og Klaksvík. Fyrstu árini vóru nógvir danir í starvi í Eysturoy og harvið eisini í Klaksvík. Tey seinnu árini er liðið av teimum, sum búgva í Klaksvík og arbeiða á HF skeiðnum vorðið stórt og støðugt. Tað hevur verið stórur fyrimunur. Millum teirra, sum hava undirvíst nógv á Klaksvíkar HF skeiði, eru Kári Purkhús, Kári Nolsøe Olsen, Anna Thomsen, Nikolina Olsen, Óluva Klettskarð, Katrin Næs og Jóannes Hansen.

## Brotasjógvar

Síðani studentaskúlin í Eysturoy sá dagsins ljós í 1982 hava fleiri royndir verið gjørdar at niðurleggja Klaksvíkar HF skeið ella at flyta tað í skúlan í Eysturoy, sum umsitingin og politiski landsmyndugleikin hava orðað ætlanirnar.

Onkra ferðina hevur staðið heilt illa til. Tá hava næmingar, lærarar og lokali myndugleikin tikið lógvatak, og so hevur tað eydnast at varðveita skúlan.

Undir stóru kreppuni fyrst í nítiárunum var um reppið, at Klaksvíkar HF skeið varð svævað. Tá var tað skifti í landsstýrinum, sum bjargaði skeiðnum. Bergur Jacobsen úr Klaksvík varð valdur at vera landsstýrismaður í skúlamálum 24. apríl 1993, tá ið Sjálvstýrisflokkurin aftur varð partur av samgonguni, og stutt eftir varð ætlanin slept um hetta summarið at niðurleggja skeiðið.

Í 1996 var aftur nær við, at hurðin í Víkunum varð latin aftur fyri síðstu ferð. At kreppurakti landskassin var so illa fyri, var orsøk til, at landsstýrismaðurin í skúlamálum í 1995 setti nevnd við tí setningi at vísa á, hvussu tað í fíggjarlógini fyri 1996 kundi bera til at spara fleiri milliónir innan undirvísingarøkið. Nevndin fór eftir útbúgvingunum uttanfyri høvuðsstaðin og skeyt eitt nú upp, at fiskivinnuútbúgvingin varð flutt til Tekniska skúla í Klaksvík, og at Klaksvíkar HF skeið varð flutt yvir á Kambsdal. Eingin upptøka skuldi vera í Klaksvík á sumri í 1996, og tey, sum tá fóru í 2. flokk, skuldu halda fram á Kambsdali. Heldur ikki tann royndin eydnaðist.

Eyðkent fyri royndirnar at niðurleggja skeiðið hevur verið, at tær eru íkomnar orsaka av, at talan hevur verið um fíggjarliga sperda støðu, heldur enn at talan hevur verið um yvirskipaðan politikk á økinum.

## Skifti í aldursbýtinum

Tey fyrstu árini var Klaksvíkar HF skeið mannað við blaðungum fólkum. Øll tey nítjan, sum tóku prógv í 1976, vóru fødd í fimmtiárunum, og tey flestu vóru fødd 1954-1957. At møguleikin at taka HF prógv í heimbýnum var kærkomin, tí tað harvið slapst undan í blaðungum aldri at flyta til Havnar ella av landinum, sæst aftur í, at nógv tey flestu, sum tóku prógv tey fyrstu árini, vóru 19-21 ára gomul.

Talið lækkaði á klaksvíkingum og norðoyingum, sum fóru í Hoydalar, og eftir at skúlin í Eysturoy var vorðin veruleiki, fóru fleiri úr Norðoyggjum um Leirvíksfjørð at taka miðnámsprógv.

Áhugin fyri HF skeiðnum hevur kortini framvegis verið stórur. Seinnu árini hava tað verið meiri tilkomin, sum hava tikið prógv í Klaksvíkar HF skeiði. Tað er vorðið alt vanligari, at næmingar hava tikið útbúgvingina yvir trý ár. Millum næmingarnar eru tað nú nógvar kvinnur, sum eftir at hava verið burtur frá skúla og útbúgving nýta hetta høvið at byrja aftur á undirvísingarleiðini, eftir at tær hava átt børnini.

Útbúgvingin líkist meiri tí, sum danir nevna VUC ella Voksen Uddannelses Center. Í VUC er møguleiki hjá øllum 18 ára gomlum og eldri at taka HF-fak og útbúgving (og lærugreinir í fólkaskúlanum umaftur). Hetta verður gjørt við atliti at betra um møguleikarnar fyri at fáa starv, møguleikarnar fyri umskúling, møguleikarnar fyri víðari útbúgving og persónligari menning. Í so máta er setningurin hjá Klaksvíkar HF-skeiði framvegis í tráð við grundgevingarnar, ið vórðu brúktar, tá ið spurningurin um HF-útbúgvingina kring landið á vári 1974 varð reistur fyrstu ferð í løgtinginum.

# Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy

Kári N. Olsen

## Fyritreytir fyri Studentaskúlanum og HF-skeiðnum í Eysturoy

Tá ið vit skulu greiða frá byrjanini serliga, tá ið Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy varð sett á stovn, er neyðugt at siga nøkur orð um næmingatalið av studentum generelt, og ikki minst at taka Klaksvíkar HF-skeið við inn í frágreiðingina (ein grein um Klaksvíkar HF-skeið er í hesum blaði).

Stásiligi bygningurin – eftir tátíðar meti – í Hoydølum, varð tikin í brúk í 1965. Hesin bygningurin varð ætlaður til 288 næmingar, 12 stovur á 24 næmingar.

Føroya Studentaskúli – seinni nevndur Føroya Studentaskúli og HF-skeið – varð settur á stovn 1937, og tey fyrstu 20 árini vóru í meðal góðir 10 studentar lidnir um árið, men í 1960'unum vaks næmingatalið, og tá ið komið varð út í seinnu helvt av 1960'unum, byrjaði tann stóri vøksturin í studentatalinum. Í 1968 vórðu fyri fyrstu ferð tveir matematiskir flokkar tiknir inn, og í 1972 varð málsliga deildin eisini víðkað, soleiðis at tveir flokkar vórðu tiknir inn á hvørjum ári.

Tá ið framhaldsdeildir komu á teim størru bygdunum, minkaði tørvurin á realdeildini á Studentaskúlanum, og í 1973 vórðu teir seinastu realskúlanæmingarnir tiknir inn. Í staðin kom so HF. Í 1974 varð HF-útbúgvingin sett á stovn í Hoydølum við tveimum deildum úti um landið, eini í Suðuroy og eini í Klaksvík.

So hvørt sum áhugin gjørdist størri fyri students- og HF-útbúgvingini, vaks trýstið á skúlan í Hoydølum. Í 1980 verður sagt í Hoydølum, at vøksturin í talinum av nýggjum næmingum er so stórur, at skúlin akkurát klárar at húsa teimum, sum byrja í august 1980, treytað av, at skúladagurin verður longdur við einum tíma. Í 1980 verður HF-skeið eisini sett á stovn við Gøtugjógv, soleiðis at nakað av trýstinum verður tikið av Studentaskúlanum í Hoydølum.

Í oktober mánað 1980 setti landsskúlastjórin nevnd at meta um støðuna í Hoydølum. Nevndin sigur, at "Í hesum skúlanum (t.v.s. Føroya Studentaskúla í Hoydølum), sum fyri stívliga 15 árum síðani varð gjørdur til 288 næmingar, ganga í dag umleið 510 næmingar, og ger hetta viðurskiftini í skúlanum ikki sørt ruðuleikakend".

Nevndin sigur eisini, at neyðugt er við skúla aðrastaðni í Føroyum til teir næmingar, sum pláss ikki verður fyri í Hoydølum, og at neyðugt er, at stig verður tikið til hetta í stundini, um ikki alt skal gerast ein ruðuleiki, tá farið verður undir komandi skúlaár t.v.s. 1982/83.

## Skúlin byrjar

Hetta vóru nakrar av fyritreytunum fyri Studentaskúlanum í Eysturoy, og við løgtingslóg nr. 76 frá 21. mai 1982 samtykti løgtingið at seta Studentaskúla og HF-skeið á stovn í Eysturoy, og í august mánað 1982 byrjaðu so tríggir 1. flokkar, ein málsligur og tveir matematiskir. Skúlin helt til í leigaðum hølum við Gøtugjógv frá 1982, til hann flutti í nýggja bygningin á Kambsdali í august mánað 1993.

Nú vóru næmingar tiknir inn á skúlan, men hvussu skuldu teir koma til og frá skúlanum? Bygdaleiðir vóru ongar tá, so rektarin fekk samband við teir bussførarar, ið koyrdu skúlabørn í oynni og samráddist so við teir um at koyra næmingarnar til og frá Studentaskúlanum. Bussførararnir vóru sinnaðir at taka hesa uppgávu á seg, men teir vildu ikki hava nakað við pengar at gera, t.v.s. vildu ikki krevja pening inn frá næmingunum, so skúlin seldi ferðaseðlar ella mánaðarkort á skrivstovuni, inntil bygdaleiðir komu í fasta legu miðskeiðis í áttatiárunum.

## Umstøðurnar á skúlanum

Umstøðurnar við Gøtugjógv vóru alt annað enn nøktandi, og tað gekk bara við einum góðum vilja, og við at øll hjálptust sum frægast.

Tá ið Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy vóru mest "spjødd", helt skúlin til í 8 ymiskum støðum við Gøtugjógv:

- Í 1887 skúlanum
- Í 1929 skúlanum
- Í Gamla svimjihyli, ið bleiv umbygdur til studentaskúla
- Á Handilsloftinum hjá Haldor Konoy
- Í Bilhúsinum hjá Jakku skómakaranum
- Í Losjuni
- Í Barnaskúlanum í Gøtu
- Í privathúsum við síðuna av Gamla svimjihyli

Frá 1983 var ítróttarhøllin á Kambsdali eisini nýtt til fimleik og aðrar ítróttargreinar.

Av serstovum var í fyrstani bert kemi/biologi hølið, sum var í kjallaranum í "1929 skúlanum". Fyri at nøkta tørvin á serstovum var neyðugt at samstarva við barnaskúlan við Gøtugjógv. Frá barnaskúlanum lænti Studentaskúlin: fysikkstovu, fimleikahøll/svimjihøll, bókasavnið, har tónleikaundirvísingin fór fram, og Auluna til felagstímar. Barnaskúlin hevði næmingar frá 1. til 7. flokk, tað vil siga, at hesir næmingarnir vóru í einum heilt øðrum aldursbólki enn næmingarnir, ið gingu á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum, so neyðugt var sjálvandi at laga seg hvør eftir øðrum. Tað var tætt samstarv ímillum skúlanar

báðar, og eitt slíkt samstarv er bert gjørligt, um viljin til samarbeiði er til staðar. Sigast má, at samstarvið var sera gott við lærararnar við Gøtu skúla, teir broyttu skema, og vóru altíð til reiðar at hjálpa við onkrum, tá ið biðið varð um tað.

Kantinuviðurskiftini vóru eisini út av lagi fyrstu tíðina, og var kantinan á loftinum í "1929 skúlanum". Har kundu næmingarnir keypa: kaffi, te, sodavatn, rundstykkir, men pláss var ikki fyri meir enn 8-10 næmingum at sita í senn. Í 1985 flutti kantinan niðan í kjallarahæddina í nýggja bygninginum, t.v.s. bygninginum, ið bygdur varð oman á gamla svimjihylin. Nú kundu umleið 90 fólk sita, men tað nøktaði langt frá tørvin. Í kantinuna komu eisini bløðini – bæði føroysk og donsk.

Longu í 1984 var næmingatalið vorðið so stórt, at ikki var møguligt at hava skrivligu ársroyndina á skúlanum, samstundis sum HF-próvtøkurnar fóru fram (fyrr vóru skrivligu HF-próvtøkurnar fyrst í mai mánað – áðrenn skrivligu studentsprópvtøkurnar). Tí var neyðugt at finna annað høli, og gjørdist tað Ítróttarhøllin í Runavík. Ítróttarhøllin í Runavík var stak væl egnað at hava terminsroyndir, ársroyndir og próvtøkur í. Har kundu saktans 100 fólk sita, uttan at luftin gjørdist tung og kvalin. Vit brúktu Ítróttarhøllina í Runavík til allar royndir og próvtøkur, til skúlin flutti inn á Kambsdal í 1993. Tað var eitt øgiligt knoss og baks, áðrenn royndirnar og próvtøkurnar. Allar orðabøkur, formlasøvn, pappír og hvat annars skuldi nýtast, mátti koyrast út til Runavíkar. Man mátti snøgt sagt hava alt við, og onki mátti liggja eftir við Gøtugjógv av tí, sum brúkast skuldi.

## Lærarahópurin

Stóri trupulleikin fyrstu árini var lærarahópurin, soleiðis at skilja, at skiftið av lærarum var sera stórt. Hyggja vit t.d. at árinum 1984, so byrja 12 nýggir lærarar, og 9 lærarar fara. Skúlaárið 1983/84 var lærarahópurin íalt 34 lærarar. 1985 eru 11 nýggir lærarar, og 11 sum fara. Skúlaárið 1984/85 var lærarahópurin íalt 50 lærarar. Hetta stóra tal av lærarum kemst av, at vit høvdu nógvar tímalærarar, og nógvir av teimum høvdu heilt fáar tímar.

Ein stórur partur av lærarunum vóru danir, og nógvir av teimum vórðu settir eftir tí sonevnda 2-ára sáttmálanum. 2-ára sáttmálin merkti, at danskir lærarar aftan á 2 ár á skúlanum kundu søkja starv á jøvnum føti við aðrar umsøkjarar, um teir høvdu lokið skeið, sum landsskúlafyrisitingin skipaði fyri, í føroyskum máli og føroyskari mentan. Danskir lærarar fingu altíð ferð og flytigóðs goldið, tá ið teir komu til Føroya. Fóru teir aftur til Danmarkar aftan á 2 ár, fingu teir eisini heimferðina við flytigóðsi goldna frá skúlanum.

Tað, at ein stórur partur av lærarunum vóru danir, hevði við sær, at lærararáðsfundirnir vórðu hildnir á donskum til ársskiftið. Tá varð hildið, at teir skiltu so mikið av føroyskum, at fundirnir kundu haldast á føroyskum. Henda mannagongdin, við at halda lærararáðsfundirnar á donskum fyrsta hálva árið, vardi líka til miðskeiðis í 1990'unum.

Ein annar bági, hvat lærarum viðvíkti, var, at tað var ikki altíð líka lætt at fáa lærarar við akademiskari útbúgving til allar lærugreinir. Hesin trupulleiki varð sum oftast loystur, við at fólkaskúlalærarar lósu tímarnar, og so var ein stuðulslærari úr Hoydølum, sum hevði umsjón við, at undirvísingin var í lagi. Stuðulslærarin kom norður einar 6 – 8 ferðir um árið. Umframt at hava eftirlitið skuldi stuðulslærarin gera próvtøkuspurningar og hava næmingar upp til próvtøku. Hendan skipan við stuðulslærarum var bert tey allar fyrstu árini.

## Studentaskúlaskipanin

Studentaskúlaskipanin, sum var galdandi, tá ið skúlin við Gøtugjógv varð stovnaður, var ein greinskipan. Næmingarnir á málsligu deild kundu aftan á fyrsta árið velja ímillum nýmálsliga grein ella samfelagsgrein. Næmingarnir á matematisku deild kundu velja ímillum matematisk-fysiska grein, biologiska grein og samfelagsgrein. Á samfelagsgreinini kundu næmingar úr bæði málsligu og matematisku deild lesa nakrar lærugreinir saman. 13 næmingar (bæði málsligir og matematiskir) valdu samfelagsgreinina aftan á fyrsta árið, t.e. 1983, men skúlin fekk ikki loyvi at seta hesa grein á stovn. Hesir 13 næmingar kundu velja ímillum at gevast við skúlagongdini, fara á annan skúla ella á eina aðra grein. Nakrir næmingar avgjørdu at skifta skúla, og hevði hetta stórt árin á hinar næmingarnar, og tað skuggaði yvir gleði teirra, tá ið tey tóku studentsprógv, at nakrir av teirra floksfeløgum nú tóku studentsprógv á øðrum skúla.

## Hvar skal nýggjur studentaskúli byggjast?

Tað var nógv kjak um skúlan gjøgnum árini, og hetta kjak snúði seg fyrst og fremst um, hvar skúlin skuldi standa. At studentaskúli skuldi setast á stovn í Eysturoy, vóru øll samd um, men tað vóru bæði flokkar og persónar, sum lótu lokal áhugamál ganga fram um yvirordnaða sjónarmiðið, og hevur hetta helst darvað byggingini – kanska í fleiri ár.

17. mars 1988 legði landsstýrismaðurin í skúlamálum “Uppskot til Løgtingslóg um bygging av ávísum skúlum” fyri løgtingið. Í hesi løgtingslóg stendur, at ástøðisskúli (HF- og studentaskúli) skal byggjast í Eysturoy, og í løgtingslógini stendur eisini, hvar skúlin skal byggjast, nevniliga í Gøtudali. Landsskúlafyrisitingin verður í brævi, dagfest 22. juli 1988, biðin um at fara undir at fyrireika og byggja nevnda skúla. Í november 1988 ávísti Gøtu kommuna øki í Gøtudali til hesa bygging.

Politiskt var talan um eina turbulenta tíð. Nýtt landsstýri tók við í januar 1989, og nýggi landsstýrismaðurin í skúlamálum setti eina 3 manna nevnd at kanna eftir teimum fyrimunum, peningaliga og undirvísingarliga, sum standast av at byggja studentaskúlan nærhendis handilsskúlanum í Eysturoy. Eru fyrimunir, verður málið loyst samsvarandi kanningarúrslitinum. Nevndin kom til ta niðurstøðu, at fyrimunir vóru við at byggja

nýggjan studentaskúla í Eysturoy á Kambsdali heldur enn í Gøtudali. Peningaligi fyrimunurin var størstur, um bygt varð saman við Handilsskúlanum. Mett varð, at sparast kundu 14,8 mill krónur. Harumframt varð mett, at í alt kundi raksturin gerast 600 – 900 tús. krónur bíligari pr. ár. Undirvísingarliga varð eisini mett, at nógvir fyrimunir vóru við eini samanbygging. Nevnt varð: felags lærarar, bjóða lærugreinir hvør til annan, nýggjar útbúgvingar, føroyskar royndir o.s.fr. Tann 2. august 1989 kemur Landsstýrið við uppskoti til broyting í løgtingslóg um ávísar skúlar, har orðingin í løgtingslóg frá 9. juni 1988 fær hesa broyting: "Gymnasiala útbúgving í Gøtudali í Eysturoy", verður broytt til "Gymnasiala útbúgving á Kambsdali". Nýggi Studentaskúlin og HF-skeiðið bleiv sostatt bygdur á Kambsdali, men samstarvið, ið var grundarlagið fyri at byggja skúlan saman við handilsskúlanum, hevur gjøgnum árini verið minimalt.

Tann 6. mars 1990 samtykti landsstýrið at góðkenna tað prosjektið, sum tá fyrilá av skúlanum, har kostnaðurin varð mettur til 33 mill. krónur. Í sambandi við fíggjarlógina fyri 1991, varð farið undir ymiskar sparingar, og heitti landsstýrið tá á bygginevndina fyri skúlan um at kanna møguleikarnar fyri at minka prosjektið við umleið 10 mill. krónum, ella niður á 23 mill. krónur. Tað var sjálvandi sera trupult nágreiniliga at gera av, hvussu nógvir fermetrar skuldu takast burtur, svarandi til tær 10 mill. krónurnar. Fyri at spara pening til umprosjektering og av byggitekniskum grundum, varð avgjørt í fyrstu atløgu at taka allan tann norðasta bygningin (felagshøllina, køkin og sangstovuna) burtur úr prosjektinum. Tá ið skúlin var liðugur í 1993, leyp so mikið av pengum av, at sangstova varð bygd á 2. hædd, samstundis sum vit fingu eina stovu eyka (undir sangstovuni) á 1. hædd. Í 1998 fingu vit so "klossan", sum varð tikin úr í sparirunduni, nevniliga skúlahøllina og køkin aftur, og var kostnaðurin umleið 5 mill. krónur.

Skúlin varð sostatt bygdur í ringastu krepputíð í ára tíggju og hann er eisini merktur av tí. Gongirnar eru sera smalar. Bókasavnið er úti undir eini væðing. Ónøktandi viðurskifti hjá lærarum at fyrireika seg á skúlanum, og soleiðis kundu vit blivið við. Men við einum góðum vilja, tolsemi, og at hvør roynir at gera sum frægast, hevur skúlin koyrt væl, og prógvini, ið verða útskrivað, eru fult á hædd við tey í øðrum skúlum.

## Tal av prógvum og flokkatal

Av Studentaskúlanum og HF-skeiðnum í Eysturoy eru til og við 2014 íalt útskrivað 2158 students- ella HF-prógv. Umframt hesi 2158 heilu prógv, er eisini ein hópur av stakgreinaváttanum – váttan fyri eina ella fleiri lærugreinir – útskrivaður.

Skúlin hevur skúlaárið 2014/2015 16 flokkar, 14 studentaflokkar og tveir HF-flokkar, og er hetta størsta flokkatal, sum skúlin nakrantíð hevur havt.

## Kvøldsetur

Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy hevur seinastu 15 árini skipað fyri tveimum kvøldsetum hvørt skúlaár. Kvøldsetan um heystið er vanliga í november mánað, meðan kvøldsetan um várið  er í mars mánað. Á kvøldsetuni í mars mánað hevur sum oftast ein fyrrverandi næmingur greitt frá tíðini, hann/hon gekk á skúlanum. Ferðafrásagnir frá túrunum hjá 3. flokkunum eru eisini fastur táttur á skránni. Møguleiki er hjá lærarum og næmingum at profilera sína lærugrein. Nógvur tónleikur er altíð við. Lærugreinin leiklist plagar at sýna tað fram, tey hava arbeitt við. Fleiri ferðir hava næmingar og lærarar sýnt fram listarlig verk, bæði málningar og fotomyndir. Yngri flokkar selja kaffi og køkur, soleiðis at tey kunnu savna nakrar krónur til námsferð. Hesar kvøldsetur eru vanliga væl vitjaðar, og fáa eisini góð skotsmál frá teim vitjandi. Hetta er ein roynd at koma í sambandi við nærumhvørvið, og hon hevur eydnast.

*Ummæli*

# Ævintýr – eitt valaverk

Tórður Johannesarson

**Í desember í fjør kom út bókin *Ævintýr*. Eyðun Andreassen skrivaði, og forlagið Fróðskapur gav út. Bókin er eitt valaverk og sannur fongur fyri lærarar og fyri miðnáms- og setursnæmingar.**

**Á baksíðuni stendur m.a.: "Genturnar í ævintýrum eru klókar og vitandi, vita hvat tær vilja, og hvat tær skulu gera. Tær hava vilja, treyst, tol og seiggj at fremja sínar ætlanir og hava megi, áræði og dirvi at taka um endan, tá ið á stendur." Júst hetta gongur sum reyður tráður gjøgnum alla viðgerðina.**

## Prologur

Eyðun hevur býtt bókina sundur í prolog, tveir høvuðspartar og epilog. Í prologinum greiðir hann stutt frá um ævintýr, tí veruleikakenda og tí íspunna. Sum lesari sakni eg ein part um, hvat fyri háttalag, Eyðun hevur brúkt. Eg kundi hugsað mær, at hann vísti lesaranum nágreiniliga, hvørjar keldur, hann hevur brúkt. Eyðun brúkar t.d. bara ævintýr, sum standa í bókini hjá Jákupi Jakobsen, *Færøske folkesagn og eventyr*, men hví bara hesi ævintýr? Helst er tað eitt tilvitað val hjá Eyðuni ikki at hava ein lærdan inngang, tí at ígjøgnum alla bókina er meginæðrin ævintýrini og frásagnirnar. Hetta fáa vit staðfest, tí at beint eftir prologin kemur ævintýrið "Genta og drongur í risahellinum."

## Fyrri partur

Bulurin í bókini eru báðir høvuðspartarnir, tann fyrri ástøðiligari enn hin seinni. Fyrri partur byrjar við, at Eyðun greiðir frá gandaævintýrum. Parturin er sera góður. Vit fáa at vita, hvat ið eyðkennir gandaævintýr, og Eyðun dregur fram tað kenniliga og fantastiska umhvørvið, sum ævintýrini snúgva seg um. Hann leggur tilvitað fyri við at greiða frá um gandaævintýr sum skaldskaparslag, har gentur eru høvuðspersónar. Síðan lýsir hann dreingjaævintýr. Hetta ger hann, tí at gentur og teirra leiklutur í ævintýrum eru sum heild ikki nóg væl viðgjørd í Føroyum.

Á síðu 15 býtir Eyðun gandaævintýr sundur í tríggjar partar: gentuævintýr, dreingja-ævintýr og barnaævintýr. Hann kemur eisini inn á eyðkenni. Í viðgerðini verður næstan einki gjørt burtur úr barnaævintýrum.

Hann vrakar tulkingar, har granskarar síggja gentuævintýr sum frásagnir um gentuna, ið bíðar eftir prinsinum á hvíta hestinum, og tekur hana inn í eitt glæsiligt lív. Um tulkingar av fátæka dronginum, ið verður kongur, sær hann sum ímynd av vesturlendskari, ikon-iskari hugmynd, sum er bygd á hugsanina um mannin, ið smíðar sær eydnuna góða. Slíkar tulkingar samsvara ikki við innihaldið í gandaævintýrum. Hann kallar hetta av røttum mentanarligar mistulkingar. Hann grundgevur fyri hesi mistulking í partinum um ævin-týrsøguna, (s. 19-26).

Á síðu 20 kemur Eyðun inn á føroysk ævintýr. Hann skrivar, at tey líkjast nógv teimum norðurlendsku ævintýrunum, og at tey føroysku munnu koma haðani. Her kemur hann til somu niðurstøðu sum Jákup Jakobsen og Åse Nyman. Åse vísir á, at hóast føroyingar helst munnu hava lisið ævintýrini úr norðurlendskum bókum, so hava tey fingið ein føroyskan dám og eru so listuliga fortald, at vit ivast ikki í, at søgurnar eru um bygdargentur og bygdardreingir í Føroyum.

Eitt sindur provokerandi skrivar Eyðun niðast á síðu 20, at umframt arbeiðið hjá Åse Nyman er ikki nógv fyndugt skrivað um føroysk ævintýr. Hann nevnir tríggjar greinir í *Varðanum*, eina hjá Kirsten Brix og tvær hjá Hjalmari P. Petersen, og so eina hjá Reidari Th. Christiansen, sum stóð í *Nordisk kultur, bind IX*.

Her gevi eg Eyðuni rætt. Tað hevur verið alt ov lítið granskað og skrivað um føroysk ævintýr. Tó skal sigast, at føroysk ævintýr eru viðgjørd í t.d. *Fjørið mítt* og *Les 3*. Onkur ritgerð er eisini um ævintýr á fróðskaparstigi.

Parturin á síðu 23 um ævintýrtypur er sera spennandi. Her verður komið inn á altjóða skrá yvir øll kend ævintýr, sum eru skipað í typur, ið nevnist ATU. Upp í hesa skrá verða roknað tey ævintýr, ið verða mett at siga somu søgu, hóast tey í mangar mátar kunnu tykjast ólík í frásøgn og motivum. Føroysk ævintýr hava eisini fingið pláss í skránni. Størsti parturin í ATU eru gandaævintýr. Í Færøske folkesagn og æventyr eftir Jákup Jakobsen eru prentað og umrødd 79 ævintýr við frábrigdum. 45 av teimum hoyra til henda bólk, (s. 24). Eyðun vísir á, hvar tey 45 ævintýrini hoyra heima í ATU, (s. 24-25).

Hann ber fram, at orðið gandaævintýr er misvísandi, tí hesi ævintýr hava ikki við gand at gera, sum vit t.d. hoyra um í søgnum. Fleiri granskarar brúka nú á døgum orðið fairy tales; men hetta orðið vil Eyðun ikki brúka. Hann hevur enn ikki funnið nakað brúkiligt orð á føroyskum, og brúkar tí orðið gandaævintýr.

Hann vísir á, hvussu týski ævintýrgranskarin, Max Lüthi, (1968) lýsir, hvat eyðkennir gandaævintýr. Lüthi skrivar m.a., at høvuðspersónurin í ævintýrum ikki er knýttur at

familjubondum. Eyðun mótprógvar hesum so dyggiliga við t.d. eini greining av *Vetilskonu*. Sum rætt er, vísir hann eisini á, at fleiri onnur dømi eru, (s. 29).

Eyðun kemur við sera góðum og áhugaverdum tulkingum í partinum Uttanverð og innanverð. Hann brúkar ástøðið hjá Lüthi um gandaævintýr og viðger munin millum frásagnir um gentur og dreingir. Granskarar hava gjørt nógv burtur úr avrikunum hjá dreingjum. Í gentuævintýrunum verður lítið gjørt burturúr, sjálvt um avrikini eru nógv størri enn hjá dreingjum. Eyðun leggur ikki fingrarnar ímillum, tá ið hann finst at ævintýrgranskarum, sum lata seg tøla av dreingjunum í ævintýrunum og fáa ikki eyga á gentuna og hennara avrik. Hann kallar hesar fyri mentanarligar, sjónbrekaðar ævintýrgranskarar, (s. 33).

Á síðu 34 kemur hann inn á strukturar og Vladimir Propp. Har tekur hann fram føroysk ævintýr og setir inn í funktiónirnar hjá Propp. Eyðun vísir á við dømum, at funktiónirnar hjá Propp ikki eru nóg nøktandi, tá ið ræður um t.d. gentuævintýr. Hann heldur, at Propp leggur alt ov stóran dent á ævintýr, har dreingir hava týðandi leiklut. Eyðun gevur Propp akademiskt av grovfílini, tí at hann er fongdur av reduktionismu, (s. 36-37). Parturin um Propp gongur heilt fram til síðu 44. Eins og Lüthi hevur Propp sett kikaran fyri sítt blinda, mannliga eyga og orðar eitt alment ástøði um ævintýr, har gentan ikki reiðiliga er uppií, tí ævintýr við gentum einans verða lýst sum frábrigdi av dreingjaævintýrum. Hann heldur, at veikleikin við hugsanini hjá Propp er m.a., at hann bert greinar strukturar, og ikki tað, sum frásøgufólk veruliga siga, (s. 36).

Í bókini verður eisini komið inn á tær fimm aktirnar hjá Bengt Holbek, (s. 44). Holbek finst at strukturfrymlinum hjá Propp, tí at hesin ov einfalt fylgir lívsleiðini hjá dreingjum. Eyðun er kritiskur mótvegis aktfrymlinum, eisini tí hesin ikki hóskar til gentuævintýr, (s. 44-46).

Á síðu 46-49 fer hann eisini inn á aktantfrymilin hjá Algirdas Greimas. Hann vísir á, at hesin frymil als ikki er skottryggur og hevur síni lýti, tí at Greimas m.a. ikki tekur frásøgufólkið við í skipanina.

Undir yvirskriftini Luturin hjá dronginum verður víst á, at drongurin í ævintýrunum í stóran mun er lítið dugandi. Hann rúgvar nógv upp í frásagnunum, men hevur ofta, tá ið saman um kemur, lítlan annan leiklut enn at vera á røttum staði í rættari løtu. Hann fremur ikki avriksverk, (s. 51).

Vit lærarar á miðnámi munnu mangan hava sagt við næmingar, at høvuðspersónurin (drongurin) í ævintýrum fer eina menningarferð og hevur eitt mál, nevniliga at mennast. Eyðun skrivar, at fleiri av høvuðspersónunum í dreingjaævintýrinum hava einki mál við ferðini og vita ikki, hví teir gera, sum teir gera. Hann kemur við góðum dømum, sum

styðja prófførsluna. Eyðun er ikki einvegis í síni prófførslu av hesum, men vísir eisini á dreingir, ið eru knáir.

## Seinni partur

Eyðun skrivar, at granskingarluturin í hesi bók eru ævintýrini sjálv, hvussu tey eru søgd, og hví tey eru søgd, (s. 69). Hann vísir aftur, at ævintýrini kunnu brúkast til kjak um almenn, sosial viðurskifti, átrúnað, politikk ella heimspekilig ástøði. Hann sigur stutt og greitt, at ævintýrini siga frá alkendum, gerandisligum tvørleikum og tvístøðum í einum ávísum lívsskeiði í ungdóminum, (s. 69). Tey eru samskifti, har felags almenna bakgrundin er mál, trúgv, siðir, lívskor o.a. Stutt sagt kreativar, mentanarligar framsetingar, (s. 71). Hann greiðir m.a. frá klúgving, eksternialisering, kontraktión, kvantifisering, hyperbul, projektión o.ø. Her greiðir hann væl frá við góðum dømum.

Níggju ævintýr verða greinað og tulkað. Greiningarnar og tulkingarnar er ómetaliga góðar, og bæði næmingar og lærarar fara at fáa stóra gleði av hesum arbeiði Eyðunar.

Í fyrra parti av bókini vísir Eyðun á, at strukturalistar sum Propp eru blindaðir av strukturum og hava m.a. gloymt ein týdningarmiklan part, nevniliga frásøgufólkið. Eyðun svíkur ikki lesaran. Umframt at greina og tulka ævintýrini, lýsir hann m.a. frásøgufólkini og setir ævintýrini í sín rætta samtekst. Í seinna parti brúkar hann ta hugsan, sum hann hevur lagt fyri lesaran í fyrra parti, og alt rennur saman í eina hægri eind.

## Epilogur

Epilogurin er stuttur, eins og prologurin. Argandi skrivar Eyðun í fyrstu reglu, at veruleikin er ikki til. Tað einasta, vit hava , eru søgurnar um veruleikan. Lukkutíð, sigur Eyðun, hava tó funnist og finnast enn skapandi fólk sum Erika Katrina í Lykkirshúsi á Syðradali og mong onnur, ið hava kunnað og kunnu enn siga søgur úr klókum sjónarhorni, so glið hóast alt er á. Tá verður meining í søgunum.

## Sum heild

Við hesum verki hevur Eyðun Andreassen ríkað okkum almikið. Við sínum livandi máli hevur hann skrivað eina bók, sum púra vist kemur at standa í mong ár. Hon stendur eisini mát við aðrar slíkar vísindaligar bøkur um ævintýr. Í 1986 gav Eyðun út bókina *Úr søgn og søgu*. Tann bókin verður enn brúkt í fólkaskúla og á miðnámi og er eitt valaverk. Tað sama er at siga um hesa bók. Eyðun hevur víst á, at hugmyndir sum strukturalisman brúka blinda eygað fyri at skilja gentuævintýr. Slíkar hugmyndir hava hámett dreingjaævintýrini. Rithøvundurin hevur eisini sett ævintýrini inn í tann samtekst, sum tey hoyra til, nevniliga sum frásagnir, ið eru sagdar úr klókum sjónarhorni. Eins og gløggu frásøgufólkini, so er sjónarhornið í hesi bók sera klókt.

# Eingilskt er føroyskt

Olav Absalonsen

Tá ið eg fór í 6. flokk fyri mongum árum síðani, skuldu vit hava eingilskt fyri fyrstu ferð. Í tímatalvuni brúkti skúlin tá orðið eingilskt. Eitt ella tvey ár seinni, var hetta broytt til enskt, sum tá var eitt fremmant orð fyri mær, men tá ið myndugleikarnir brúktu tað, fekk ein ta fatan, at tað mundi vera meira føroyskt enn *eingilskt*. Henda fatan fekk tó eitt skot fyri bógvin, tá ið ein lærari nøkur ár seinni, eitt sindur tilvildarliga, kom inn á evnið; hann helt, at eingilskt var tað rætta orðið á føroyskum, og at enskt var óføroyskt. Hann kom eisini við grundgevingum fyri hesum.

Hann vísti á, at orðið eingilskt finst í nógvum staðarnøvnum í Føroyum. Hesi dømi eru at finna hjá Símuni Hansen (1966):

> *Á fjøllunum sunnan fyri bygdina í Svínoy er lítið hús, sum fólk fær kropið inn í; tað rópast Eingilskahúsið, sum eftir navninum at døma kundi sipað aftur til ófriðartíðir, men húsið er so lítið, at ikki fær meir enn eitt fólk verið inni, ei heldur er útsýnið av tí besta har, so navnið kann vera komið av onkrum øðrum.*
>
> *Beint oman fyri húsini í Kunoy er Hálendaraskor; hagar skuldu kuningar einaferð rýma undan hálendarum, men teir duttu oman í brattanum og doyðu, meðan kuningar sjálvir sluppu til rýmingar. Heimantil í Jarðardali undir Breiðskorahamri er Eingilskarókin; hagar skuldu kuningar einaferð vera rýmdir undan eingilskmonnum.*
>
> *Bæði í Mikladali og á Trøllanesi eru staðarnøvnini Eingilskigarður; í báðum plássum er hesin garður í bakkanum við lendingina, og søgnin sigur, at teir eru gjørdir fyri at verja uppgongdina av helluni móti ránsmonnum.*

At orðið er at finna í gomlum staðarnøvnum, kundi bent á, at eingilskt er gamalt orð á føroyskum. Tað, sum eisini er áhugavert, er tvíljóðið í byrjanini á orðinum, sum verður úttalað ymiskt: í flestu dialektum verður sagt ongilskt, men í onkrum støðum siga tey angilskt, og fyri ikki at gera mismun, verður orðið tí stavað við ei. Hinvegin verður Ongland ikki stavað við ei, tí at eingin føroyingur sigur Angland, og so er eingin orsøk at skriva Eingland. Tó hevur hesin stavingarháttur verið nýttur, áðrenn skriftmálið hevði fingið so fastar reglur, sum tað hevur í dag. Hesi brot eru úr Føroyingatíðindum (nr. 6, juni 1890):

*Tey flestu av teimum Føroysku rossunum, ið nú verða seld til Einglands, verða havd til at draga kol inni í kolholum.*

*Í Hetlandi er eitt fínligt rossaslag, heldri smærri enn tað Føroyska. Fleiri menn hava har í mong ár lagt sær nær at fáa slagið so vakurt og fínligt sum møguligt, og selja nú mongd av slíkum rossum til Einglands.*

Sambandið millum tvíljóðið ei og sjálvljóðið o er serføroyskt. Vit kenna tað aftur í orðum sum eingin og ongan, sum verða stavað soleiðis, tí at nakrir føroyingar siga angin, men allir siga ongan. Tað er spell, at hetta snøgga og serføroyska orðið *eingilskt* er trokað til viks, og lærd sum ólærd í staðin brúka einans orðið enskt fyri eingilskt. Tað, sum ger mun, er helst, at skúlar og skúlamyndugleikar skriva heldur *enskt* enn *eingilskt*, og eisini forløg, sum geva skúlabøkur út, hóast móðurmálsorðabókin ikki á nakran hátt hevur vrakað orðið eingilskt – tvørturímóti. Har finna vit til dømis navnorðini eingilskdansur og eingilskmaður.

Lat meg enda við einari søgu úr gerandisdegnum. Eg prátaði við ein mann, sum var fluttur til Føroya og ikki hevði føroyskt sum móðurmál, men hann dugdi rættiliga væl føroyskt. Hann fortaldi í skemti, at hann hevði tosað føroyskt við ein mann, sum ikki skilti hann so væl: *Men hevði eg vitað, at hann var enskmaður, so kundi eg bara havt tosað enskt við hann*. Hann hevði helst hoyrt orðið eingilskmaður, men royndi at vanda sær um málið.

## Keldur

*Føroyingatíðindi*, nr. 6, juni 1890.
J. Símum Hansen, *Havið og Vit II*, Egið forlag, Klaksvík 1966.